| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>16. juni 2016 | Blað nr.: 1 |
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 16. juni 2016 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 157/16 – 191/16

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Johan Olsen
Sigrun Amalia Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdottir
Jóan Petur Hentze
Sigurð Ó. Vang
Randi Saxov
Óla Jákup Rólantsson

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>16. juni 2016 | Blað nr.: 2<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 159/16 | 16/00042-1 | Mál beind í nevndir 2016 | 4 |
| 160/16 | 16/01514-1 | Árligur rakstrarstuðul á mentanarøkinum – flyting til aðrar kontur | 5 |
| 161/16 | 16/01585-1 | Eykajáttan til Heilsu- og umsorganartænastuna 2016 | 6 |
| 162/16 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 10 |
| 163/16 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 18 |
| 164/16 | 14/04763-136 | Umsókn um stuðul til umvæling av Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll - skeyti 1386 - ymiskt tilfar í eini kassettu (1999-0345) | 21 |
| 165/16 | 16/01195-1 | Samstarvsavtala við Sandoy um barnatannrøkt | 39 |
| 166/16 | 15/04635-3 | Umsókn um framhaldsdeild í Sankta Frans skúla | 41 |
| 167/16 | 15/03660-1 | Umsiting og býráð flyta út á Vestaru Bryggju | 47 |
| 168/16 | 16/00407-3 | Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík | 52 |
| 169/16 | 16/02185-1 | Broyting í reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað | 55 |
| 170/16 | 14/03251-17 | Bygging av dagstovni í Kollafirði | 56 |
| 171/16 | 15/05000-1 | Søla bygningur matr. nr. 320a. ( Hugskotið ) | 59 |
| 172/16 | 16/02101-1 | Møgulig søla av Dagstovninum millum Bóla | 62 |
| 173/16 | 16/00962-1 | Tórsvøllur - vestursíðan | 63 |
| 174/16 | 15/03170-8 | Vegna Búrøkt Kristjan á Neystabø : Viðvíkjandi útstykking matr. nr. 1401a. | 67 |
| 175/16 | 14/05161-3 | Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir | 68 |
| 176/16 | 16/01722-1 | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri kommunuskúlan | 73 |
| 177/16 | 16/01923-2 | Umsókn um loyvi til víðarisølu av matr. nr. 35an, Hoyvík. | 74 |
| 178/16 | 15/04607-2 | Umsókn um byggiloyvi til uppafturbygging til frítíðarhús á | 75 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | matr. nr. 76 við Hoydalsá (Sundsvegin). | |
| 179/16 | 16/02060-2 | Skyn : Umsókn um loyvi til víðarisølu av matr. nr. 676g Tórshavn | 78 |
| 180/16 | 16/01221-3 | Áheitan á kommununa um at strika servituttin á ognini matr. nr. 1041a, Tórshavn | 79 |
| 181/16 | 16/01796-3 | Umsókn vegna Dekksentrið um keyp av parti av matr. nr. 1381b, Tórshavn | 80 |
| 182/16 | 16/01841-1 | Visit Tórshavn. Leigumál í bankabygninginum. Niels Finsensgøta. | 81 |
| 183/16 | 16/01556-1 | Bankabygningur Niels Finsensgøta. Útleigan av atkomuhædd og part av kjallarahædd. | 83 |
| 184/16 | 16/01842-1 | Tjaldurs Apotek. Leigumál í bankabygninginum í Niels Finsensgøtu. | 86 |
| 185/16 | 16/02102-1 | Leigumál neyst úti á Bakka, Froskmannafelagið. Matr.nr. 151 d & 151 e | 88 |
| 186/16 | 16/02044-1 | Orkusparandi tiltøk – gøtuljósíløgur 8275 | 89 |
| 187/16 | 14/00772-13 | Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036) | 90 |
| 188/16 | 14/01698-78 | Kommunala Brennistøðin : Endurnýggjan av ketlinum | 96 |
| 189/16 | 15/03578-1 | Ruskinnsavning – útbjóðing av sáttmála | 107 |
| 190/16 | 16/02132-1 | Framflyting og meirjáttan Tórshavnar havn 2016 | 113 |
| 191/16 | 16/00040-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016 | 114 |

# 159/16 Mál beind í nevndir 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 5/16 | 16/00042-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 34/16 | 16/00042-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 69/16 | 16/00042-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 97/16 | 16/00042-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 125/16 | 16/00042-1 |
| 6 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 159/16 | 16/00042-1 |
| 7 Býráðsfundur | | | 16/00042-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Tikið til eftirtektar.

# 160/16 Árligur rakstrarstuðul á mentanarøkinum – flyting til aðrar kontur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 113/16 | 16/01514-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 156/16 | 16/01514-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 131/16 | 16/01514-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 160/16 | 16/01514-1 |

**Málslýsing:**
Vísandi til nýggjar leiðreglur til árligan rakstrarstuðul á mentanarøkinum hjá Tórshavnar kommunu er ikki longur gjørligt at stuðla ávísum virksemi, sum áður er stuðlað á kontum á mentanarøkinum. Talan er um árligan stuðul til Havnar Bjargingarfelag og Rescue Lív, sum seinastu árini hava fingið árligan rakstrarstuðul, tils. kr. 80.000 um árið, og til Kollafjarðar Bjargingarfelag, sum hevur fingið stuðul eftir umsókn, kr. 25.000.
Mælt verður tí til at flyta upphæddina, tils. kr. 105.000, av kontu 5366 Stuðul annars til Teknisku fyrisiting – Tilbúgving, nýggj konta.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta kr. 105.000 av 5366 Stuðul annars til Teknisku fyrisiting – Tilbúgving, nýggj konta.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 161/16 Eykajáttan til Heilsu- og umsorganartænastuna 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 135/16 | 16/01585-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 13.04.2016 | 23/16 | 16/01585-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 183/16 | 16/01585-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 130/16 | 16/01585-1 |
| 5 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 161/16 | 16/01585-1 |

**Málslýsing:**
Samlaða nettojáttanin til alla heilsu- og umsorganartænastuna – konta 2720 heilsuhúsið, konta 2721 røktartænastur, konta 2722 tilboð, konta 2730 fyrisiting, konta 2731 gjøld fyri røktartænastur, konta 2750 ansingarsamsýning, og konta 2761 leiga – er í 2016 kr. 140,5 mió.

Sama nettojáttan fyri 2015 var kr. 141,1 mió. Sambært roknskapinum fyri 2015 varð meirnýtslan á hesum kontum samlað kr. 9,4 mió, sí eisini niðanfyri.

Samlaða nettojáttanin til eldraøkið í Tórshavnar kommunu í 2014 var umleið kr. 136 mió, harav umleið kr. 5 mió frá kommununi. Tá 2014 varð gjørt endaliga upp, høvdu stovnar í Tórshavnar kommunu meirnýtslu uppá kr. 5-6 mió, sum landið tá endurrindaði meginpartin av.

Tað merkir, at játtanarstøðið til eldraøkið hesi trý árini er stórt sæð tað sama.

Kommunan hevur í fíggjarætlanini bæði fyri 2015 og 2016 samtykt at taka støði í teirri játtan til eldraøkið, sum landið letur kommununi samsvarandi serliga fíggingarleistinum við afturbering av frádráttum og skatti av eftirlønarinngjøldum. Í 2015 var henda játtan í fíggjarætlanini kr. 128,4 mió og í 2016 er hon sett til kr. 131,9 mió.

Harumframt er ein skiftisjáttan fyri árini 2015 og 2016. Játtanin í 2015 var kr. 8,9 mió, og í 2016 er hon kr. 4,8 mió. Í 2017 er henda skiftisjáttan burtur.

Aftrat omanfyri nevndu játtanum frá landinum er so tann upprunaliga kommunala játtanin til eldraøkið, sum áðrenn útleggingina var til rakstur á sambýlum, heimavitjanartænastu og tilhald, kr. 5,8 mió løgd aftrat. Til síðst er eisini lønarvøkstur framroknaður.

Staðfestast kann, at játtanin fyri 2015 og 2016 í upphædd er á sama støði sum í 2014. Við so at siga sama virksemi og tænastustigi á røktarheimunum og í heimatænastuni, bæði tá um tal av brúkarum og starvsfólkanormeringum annars ræður, umframt ávísum uppraðfestingum innan fyribyrging og heilsustimbran eins og visitatión, er greitt, at virksemið kann ikki rúmast innan samtykta játtanarkarmin.

**Roknskapur 2015**
Í talvuni sæst heildarroknskapur fyri heilsu- og umsorganartænastuna fyri 2015:

| Konta | Heiti | Salda 12-2015 | Játtan 2015 | Avlop kr. 12-2015 | Avlop 12-2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| 2720 | Heilsuhúsið | 31.127.000 | 29.947.000 | -1.180.000 | -4% |
| 2721 | Røktartænastur | 106.930.971 | 99.033.000 | -7.897.971 | -8% |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2722 | Tilboð | 21.266.334 | 18.774.000 | -2.492.334 | -13% |
| 2730 | Fyrisiting | 4.730.069 | 5.790.000 | 1.059.931 | 18% |
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | -16.025.589 | -15.000.000 | 1.025.589 | 7% |
| 2750 | Ansingarsamsýning | 2.312.243 | 2.300.000 | -12.243 | -1% |
| 2761 | Leiga | 174.598 | 300.000 | 125.402 | 42% |
| | Tilsamans | 150.515.624 | 141.144.000 | -9.371.624 | -7% |

**Roknskapur pr. ultimo februar 2016**
Í talvuni sæst heildarroknskapur fyri heilsu- og umsorganartænastuna fyri januar og februar 2016:

| Konta | Heiti | Salda 02-2016 | Játtan til 02-2016 | Nýtsla higartil 02-2016 | Játtan 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| 2720 | Heilsuhúsið | 4.781.914 | 4.699.330 | 102% | 28.196.000 |
| 2721 | Røktartænastur | 19.824.035 | 17.272.504 | 115% | 103.635.000 |
| 2722 | Tilboð | 3.217.503 | 2.707.171 | 119% | 16.243.000 |
| 2730 | Fyrisiting | 443.769 | 835.000 | 53% | 5.010.000 |
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | -2.662.748 | -2.500.000 | 106% | -15.000.000 |
| 2750 | Ansingarsamsýning | 393.820 | 400.000 | 98% | 2.400.000 |
| 2761 | Leiga | 0 | 22.000 | 0% | 132.000 |
| | Tilsamans | 25.998.294 | 23.436.005 | 111% | 140.616.000 |

| Úrslit | -2.562.289 |
|---|---|

Til tølini fyri januar og februar er at viðmerkja, at uml. kr. 900.000 er eftirlønargjøld hjá tímaløntum fyri 2015. Hesi verið goldin einaferð um árið. Harumframt hevur Gjaldstovan fráboðað, at lønarútlegg frá 2015 stórt kr. 561.000 verður at skráseta sum útreiðsla á kommunala roknskapinum fyri 2016. Hetta framgongur tó ikki enn av tølunum omanfyri.

Í fíggjarætlanini fyri 2016 er lagt upp til, at Umlættingarheimið varð niðurlagt pr. januar 2016. Fráboðað er nýggj politisk viðgerð av hesi avgerð við tí endamálið, at umlættingarheimið heldur fram við vanliga umlættingarvirkseminum sum áður. Fyri fíggjarætlanina 2016 merkir tað ein fíggjartørv á 3,6 mió kr.

Við støði í tveimum teimum fyrstu mánaðunum er samlaða framroknaða meirnýtslan fyri 2016 kr. 15,5 mió.

Ætlandi verða uml. kr. 2,2 mió av minninýtslum í 2015 (konturnar 2730 fyrisiting, 2731 gjøld fyri røktartænastur og 2761 leiga) framskrivaðar til 2016.

Samlaður mettur eykajáttanartørvur fyri 2016 er sostatt kr. 13,3 mió. Tá er ikki roknað við nøkrum broytingum í tænastum ella virksemi.

Sí eisini notat við ymiskum taltilfari fyri 2015 og 2016.

<u>Uppraðfestingar?:</u>

Omanfyri nevnda upphædd kr. 13,3 mió í eykajáttan fyri 2016 hevur ikki við sær nakrar beinleiðis uppraðfestingar ella betringar í tænastustøðinum ella víðkan av virksemi ella tilboðum, men er bert ein staðfesting av veruliga kostnaðinum av verandi virksemi.
Afturmeldingar frá deildarleiðarum og starvsfólkum búeindunum er fatan av, at normeringin í røktini er ov lág. Gongdin er, at húsfólk verða meira og meira røktarkrevjandi. Mett verður, at umleið 2/3 av húsfólkunum hava tørv á, at tvey starvsfólk hjálpa við allari persónligari røkt.

Skuldi politiskur vilji verið til at játta t.d. eina dagvakt 40 tímar út á hvørja deild á búeindunum, heimatænastuni og terapeuttoyminum, t.e. 17 ársverk við miðal lønarkostnaði á kr. 430.000, so er samlaði kostnaðurin kr. 7,3 mió.

Í mun til eldrapolitikkin var stórur dentur lagdur á fyribyrging, heilsustimbran og rehabilitering. Heimatænastan er eisini partur av hesum. Til ber við lutfalsliga avmarkaðum upphæddum at røkka nógvum heimabúgvandi borgarum við viðkomandi tænastum og tilboðum, sum í síðsta enda eru við til at tálma tørvin á búplássi á røktarheimi.

Fíggjarstýringin:
Størsti parturin av lønarútreiðslunum er á búeindunum. Deildarleiðararnir hava við vaktplanleggingini ta desentralu ábyrgdina av fíggjarstýringini. Vaktplanskipanin er sett í gongd á flestu støðum. Í løtuni fáa deildarleiðararnir tó bert stýrt í mun til útlutaðar tímar. Skipanin manglar enn fíggjarstýringsmodulið soleiðis, at deildarleiðarin í vaktplanleggingini bæði kann stýra við tímum og játtan, tí tímarnir kosta ymiskt alt eftir lønarviðurskiftunum hjá einstaka starvsfólkinum. KT-deildin hevur tikið upp samráðingar við teir partar, ið varða av vakplanskipanini, um at fáa henda hentleika settan í verk skjótast gjørligt.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur somuleiðis tørv á fíggjarførleika sentralt. Heilsu- og umsorganartænastan umsitur stórar upphæddir og kompleksar skipanir og tænastur við støði í ymiskum umstøðum hjá nógvum einstøkum borgarum. Til tess at styrkja fíggjarstýringina í mun til fíggjarætlanina hjá heilsu- og umsorganartænastuni, eins og betri at kunna roknað kostnaðir fyri hvørja veitta tænastu v.m., verður mett neyðugt við fólki við fíggjarligum førleikum sum stuðulsfunktión hjá heilsu- og umsorganarstjóranum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta kr. 13,3 mió í eykajáttan til heilsu- og umsorganartænastuna fyri fíggjarárið 2016.

**Trivnaðarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at játta kr. 4,338.000,00 í eykajáttan til heilsu- og umsorganartænastuna, ið verður at fíggja sambært uppskoti, j.nr. 16/01585-4.

Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Komið er eftir, at møgulig søluinntøka av Dagstovninum millum Bóla kann ikki innganga í samtyktina um eykajáttan. Harumframt mælir fíggjardeildin staðiliga frá at regulera fíggingarlyklarnar á dagstovnaøkinum § 3 og á skúlaøkinum § 4 vísandi til, at hetta krevur eftirregulering og rættingar av sera stórum mongdum av data.
Samlað er talan um kr. 1.735.000, sum skulu takast úr teimum 4.338.000, ið samtyktar eru við fyrstu viðgerð. Hetta talið skal tí rættast til kr. 2.603.000.
**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir samsvarandi omanfyri standandi til at samtykkja eykajáttan á kr. 2.603.000 til heilsu- og umsorganartænastuna, og at spurningurin um restfígging av eykajáttanartørvinum verður tikin uppaftur eftir summarfrítíðina.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 162/16 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |

### Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 $m^2$ |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 $m^2$ |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 $m^2$ |
| | | |
| Tilsamans | | 35.819 $m^2$ |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

## 163/16 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

## 164/16 Umsókn um stuðul til umvæling av Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll - skeyti 1386 - ymiskt tilfar í eini kassettu (1999-0345)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 203/14 | 14/04763-136 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 202/15 | 14/04763-136 |
| 3 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 225/15 | 14/04763-136 |
| 4 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 275/15 | 14/04763-136 |
| 5 Mentamálanevndin | 25.11.2015 | 234/15 | 14/04763-136 |
| 6 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 299/15 | 14/04763-136 |
| 7 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 237/15 | 14/04763-136 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.12.2015 | 254/15 | 14/04763-136 |
| 9 Fíggjarnevndin | 09.12.2015 | 332/15 | 14/04763-136 |
| 10 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 3/16 | 14/04763-136 |
| 11 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 15/16 | 14/04763-136 |
| 12 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 10/16 | 14/04763-136 |
| 13 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 72/16 | 14/04763-136 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 109/16 | 14/04763-136 |
| 15 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 131/16 | 14/04763-136 |
| 16 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 107/16 | 14/04763-136 |
| 17 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 208/16 | 14/04763-136 |
| 18 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 164/16 | 14/04763-136 |

### Málslýsing:
Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørvar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhaldandi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða "høllin" í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og um-væling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).

Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í "føroyskum kr" 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

at játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | |
|---|---|
| Hækka játtanina til konto 82 | kr. 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - 1.000.000 |

| | |
|---|---|
| Samlað hækking til konto 82 | kr. 22.903.095 |
| | |
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | |
|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. 8.000.000 |
| | |
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. 9.000.000 |




Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tilmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

<u>at</u> peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

<u>at</u> peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu

umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**
Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.
1. byggistig: 1. februar 2008 – 31.oktober 2008
2. byggistig: 1. januar 2009 – 1. februar 2010
3. byggistig: 1. apríl – 27. august 2010
4. byggistig: 1. september – 30. juni 2011

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingar-háttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært "Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir"

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5 byggifyritøkur vóru innboðnar til at prekvalifisera seg til at bjóða uppá út- og umbyggingina av Høllini á Hálsi. Freistin at lata inn upplýsingar um fyritøkuna varð 6. mars kl 14.00. Av teim 5 boðnu, lótu 4 fyritøkur inn tilfar, og vóru tær allar góðkendar.

Lisitatiónin varð 28. apríl 2008 kl 10:00
Hesi tilboð komu inn

| Fyritøka | 1 byggistig | 3 byggistig |
|---|---|---|
| J & K Petersen Contractors | Einki boð | Einki boð |
| Búsetur Sp/F | kr 58.798.462,80 | kr 64.143.777,60 |
| E.Pihl & Søn Føroyar P/F | kr 64.341.329,28 | kr 69.964.259,00 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr 70.810.793,03 | kr 76.310.793,03 |

Ráðgevarin BBP-arkitekter, mettu at øll innkomnu tilboð vóru kontosiónsmessig. Víðari mæltu ráðgevin til at tikið varð av tilboðnum frá Búsetur, og at arbeiðið skuldi gerast í einum byggistigi.

Bygginevndin gjørdi hetta tilmæli.

Ein meiriluti í bygginevndin, mælir frá at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 58.798.462,00 kr, fyri at gera arbeiði í einum. Somuleiðis mælir ein meiriluti frá, at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 64.143.777,00 kr, fyri at gera arbeiðið í stigum.

Grundgevingin fyri frámælinum er, at játtaðar eru bert 48 mill. kr. til at gera arbeiðið í stigum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini vísandi til at rúm ikki er fyri verkætlanini á konto 90.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. desember 2008:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**Uppískoyti:**
Høllin, sum Tórshavnar kommuna yvirtók í 2005, er niðurslitin og tørvar átrokandi ábøtur. Arbeitt hevur verið við at fara undir útbygging av høllini, men býráðið samtykti 29. desember 2008, at arbeiðið verður ikki gjørt í hesum umfari.

Tørvurin á umvælingum í høllini er stórur, og tí verður neyðugt at gera eina tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at framflyta kr.100.000 av játtan til umbygging av høllini á Hálsi til at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**Nýtt**:
Tørvsmetingin av bráfeingis umvælingum og kostnaðarmeting er nú gjørd. Eystursíðan treingjur mest til ábøtur. Talan er her um at umvæla/skifta út umklæðingar- og brúsurúm, klædning og toilettir. Kostnaðarmetingin er sett upp í trimum punktum, sí skjálið frá HMP-Consult, dagfest 3. november 2009.

Her verður tikið saman um metingina:

| | | |
|---|---|---|
| Brúsu- og umklæðingarrúm | kr. | 3.484.100 |
| Toilettir | kr. | 861.300 |
| Arbeiðstøka samlað | kr. | 4.895.400 |
| Óvantað 15% | kr. | 734.310 |
| Projektering og eftirlit | kr. | 675.565 |
| | | |
| Samlað uttan mvg | kr. | 6.305.275 |
| Mvg 6,25% | kr. | 390.927 |
| | | |
| Samlað við MVG | kr. | 6.696.202 |

Eftir at hesar ábøtur eru gjørdar, treingir gólvið til at skiftast. Tað er í sera ringum standi, og krevur nógv dagligt viðlíkahald. Men tá hugsað verður um at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða tá takið verður skift.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,4 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (j. nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti/tilmæli:**
Fyri at gera bráðfangis umvælingar lidnar – mettar til 6,7 mió. kr. – mæla kommunustjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin til at játta 3,0 mió. kr. afturat av undirkonto 5776 í fíggjarætlanini fyri 2010 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 17. november 2009:** Nevndin tók undir við tilmælinum um netið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tekniski stjórin og býararkitekturin greiddu frá málinum. Sáttmáli verður í næstum gjørdur við HMP Consult um ráðgeving og projektering. Projekteringin tekur upp til tveir mánaðir, og mælt verður til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í summar.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Nýtt:**
Lisitatiónin var 22. des. 2010 og tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| ÁTS S/pf. | 6.117.725,56 kr. |
| Karstin A. Joensen S/pf. | 6.183.979,25 kr. |
| Valbjørn Dalsgarð S/pf. | 6.302.015,96 kr. |
| Bjarni Poulsen S/pf. | 6.343.814,48 kr. |
| Búsetur S/pf. | 6.545.180,00 kr. |
| Húsavarðatænastan S/pf. | 6.678.556,15 kr. |
| | |
| Metingin hjá HMP-Consult | 6.725.000,00 kr. |

HMP-Consult hava kannað tilboðini, og mæla til at taka upp samráðingar við ÁTS, sum áttu lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við ÁTS.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í skrivi til mentamáladeildina dagf. 13. september 2011 vísa leiðarin á Hallarumsitingini og leiðarin á Húsaumsitingini á bráðneyðugan tørv at skifta gólvið og takið. Víst verður á, at gólvið er í sera ringum standi og krevur nógv dagligt viðlíkahald, og tí treingir tað til at skiftast. Víst verður eisini á, at tá hugsað verður um, at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða, tá takið verður skift.
Høllin á Hálsi tørvar eina størri umvæling bæði innan og uttan. Ein heildarumvæling av høllini verður sambært HMP Consult mett at kosta millum kr. 18-20 mió. Á fíggjarætlanini konta 5775 Ítróttaranlegg eru í 2012 settar kr. 2,5 mió av til framhaldandi umvælingar, sambært fíggjarætlanartekstinum skulu m.a. gólvið og takið skiftast. Greitt er, at til ber ikki at skifta bæði gólvið og takið í einum fyri hesa upphædd, men fíggingin røkkur til at skifta gólvið.

Høllin hevur øll árini verið karmur um fleiri ítróttagreinar, samkomutiltøk, handilsmessur, dans og konsertir o.a. mangt. Krøv til gólv eru ymisk, alt eftir, hvat virksemið skal vera – eitt nú skal gólv til ítrótt vera bleytt, tó at krøvini hjá ymsu ítróttagreinunum eisini kunnu vera ymiskt. Gólv til eitt nú at bera bilar skal hinvegin vera hart.

Gamla gólvið hevur víst seg at vera sera gott og haldført. Ætlanin er, at høllin eisini framyvir skal vera karmur um fjøltáttað virksemi. Metast má tí skilagott, at nýggja gólvið verður bygt upp á sama hátt við møguligum smáum betringum. Ætlanin er ikki at broyta høllina annars.

Fyri ikki at órógva kappingarárið 2012-2013 ov nógv, er neyðugt, at arbeiðið at skifta gólvið verður byrjað og gjørt liðugt beinanvegin. Tá takið verður skift, verður neyðugt at verja gólvið væl, so at tað ongan skaða fær. Mælt verður tí til, at tøka íløgujáttanin kr. 2,5 mió verður brúkt til at skifta gólvið.

Fyri at arbeiðið skal ganga so skjótt sum møguligt, verður mælt til, at Húsaumsitingin, í samstarvi við Hallarumsitingina, standa fyri upptøku og burturbeining av gamla gólvinum, meðan arbeiðið at keypa og leggja nýggja gólvið á verður bjóðað út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Mett verður tó eisini neyðugt, at gongd verður sett á heildarumvælingarnar, t.e. millum annað at skifta takið, ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar,

dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan. Til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi. Mælt verður harumframt til, at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein meiriluti Jógvan Arge, Maria Hammer Olsen og Elin Lindenskov mæla til at peningur verður játtaður at skifta takið v.m. í 2013.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen mæla til at fylgja tilmælinum at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 2,5 mió. Av konto 5775, ítróttaranlegg, til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. juni 2012**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið uppá útskifting av gólvplátum og álegging av nýggjum sportslinoleum er boðið út sum undirhondsboð av HMP- Consult, ið eru ráðgevar í málinum. Tilboðini vóru hesi, uttan mvg:

Skifta gólvplátur v.m.

- Træsmiðjan Sp/f 598.210,- kr.
- Articon P/f 537.480,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 520.000 kr.

Nýtt sportlinoleum v.m.

- Gólvbúni Sp/f. 414.750,- kr.
- Eyðfinn K. Eyðunsson Fa. 388.500,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 424.000,- kr.

HMP-Consult hava kannað tilboðini og mæla til at skriva arbeiðstøkusáttmála við ávikavist Articon og Eyðfinn K. Eyðunsson, sum áttu lægstu tilboðini.

Eftir samráðingar við Articon um nakrar broytingar, er semja um sáttmálaupphæddina kr. 437,000,-.

Viðv. samlaða fíggjartørvinum verður víst til j. nr. 2012-1785.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðunum við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, frá ávikavist Articon á kr. 437.000 og Eyðfinn K. Eyðunsson á kr. 388.500, og at heimila umsitingini at gera arbeiðstøkusáttmálar við hesar.

**Mentamálanevndin 26. juli 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Maria H. Olsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðunum frá Articon við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, og at umsitingin fær heimild til at taka upp samráðingar við Eyðfinn K. Eyðunsson og Gólvbúna Sp/f og gera sáttmála um eitt gólv/sportslinoleum av sama slag sum verandi gólv.

**Býráðið 26. juli 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høllin á Hálsi hevur stóran umvælingartørv. Í fjør varð gólvið skift (konta 5775, L 57003 Høllin á Hálsi). Sum tað framgongur av málslýsingini omanfyri, er bráðneyðugur tørvur á at skifta takið í høllini. Víst verður eisini á, at ein heildarumvæling av høllini er neyðug, tað er at skifta takið, nýggja ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan.

Við støði í kostnaðarmeting frá september 2011 varð mett, at til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014. Á íløguætlanini fyri 2013 eru settar kr. 10 mió, sum í høvuðsheitum røkkur til at fáa skift takið og orkusparandi ventilatiónsskipan. Harumframt er eitt avlop á kontu L57003 uppá umleið 1 mió, sum kann verða flutt til tey arbeiði, sum gerast skulu í summar.

Sum fyrireikingar av arbeiðinum skal útbjóðingartilfar gerast. Mælt verður til at bjóða byggiarbeiðið út sum innboðin lisitatión. Ætlandi skal arbeiðið fremjast í summar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión. Harumframt verður mælt til at játta kr. 10 mió av íløgukontu 5775 fyri 2013 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og játta 10

mió. kr. av íløgukonto 5775 fyri 2013 til arbeiðið og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**Ráðgevarasáttmálar Ráðgevarasáttmálar**

**31-05-2013** Hevur HMP undirskriva ráðgevarasáttmála fyri bygnings- og EL arbeiðir.

**04-06-2013** hevur pb Consult undirskriva ráðgevara sáttmála fyri ventilatiónsprosjekt.

**21-06-2013** hevur verið licitatión fyri bygnings- og EL arbeiðir.

Innkomin tilboð:

| **Felag:** | **Upphædd** | **Fyrivarni:** |
|---|---|---|
| Articon: | Kr. 13.875.468,00 | ABF 06 |
| TG Verk | Kr. 12.873.516,98 | Tíðarætlan (Sí Skriv) |
| Búsetur | Kr. 8.635.052,01 | ABF 06 |
| Húsavarðatænastan | Kr. 9.624.351,00 | ABF 06 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum hjá Búsetur á kr 8.635.052,01.

**Mentamálanevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Høllin á Hálsi er bygd í 1970 , hevur verið meginhøllin í býnum í fleiri áratíggju og hýsir alskyns virksemi innan ítrótt, mentan, vinnu v.m. Tørvurin innan økið økist alsamt. og verður mett at ein útbygging av Høllini á Hálsi vil hava fleiri fyrimunir samanlagt í mun til kostnað, nyttuvirði og rakstur.

Tey arbeiði, sum hava verið gjørd við nýggjum umklæðingarrúmum og w.c. á eystursíðuni, nýggjum hallargólvi, taki og endaveggi uppi á tekjuni suðureftir umframt røð av brunaátøkum, eru øll gjørd við støði í prosjektinum hjá BBP arkitektum frá 2007.

Mett verður skilagott, at komandi um- og útbyggingar eisini taka støði í hesum. Tó kann verkætlanin tillagast soleiðis, at ætlað flyting av hallargólvi ikki verður gjørd, tí nyttan í mun til kostnað er ikki so áhugaverd. Eisini kann útbyggingin suðureftir tillagast ávísum kostnaðarkarmi, meðan útbyggingin norðureftir, sum er tann, ið skal geva fleiri hallartímar, kann vaksa fyri at fáa meira nyttu.

Við at byggja út norðureftir 23m heldur enn bert 18,5m, sum BBP-prosjektið hevur, so er rúm fyri tveimum flogbóltsvøllum, eins og hetta er hálvur hondbóltsvøllur aftrat til venjing. Hetta gevur sostatt fleiri hallartímar aftrat og atknýtt goymsluhøli.

Umframt tann ítróttaliga fyrimunin, so ger henda loysnin, at umstøðurnar verða munandi betri, tá stór tiltøk eru t.d. stevnur, konsertir og møtir. Høllin rúmar tá minst 2.500 fólkum.

Týðandi er, at byggingin órógvar virksemið í høllini sum minst. Tí er eisini fyrimunur, um útbyggingin norðureftir verður framd fyrst, og at ætlanirnar serliga á suðursíðuni verða endurskoðaðar. Prosjektering og støðutakan til útboð av norðurendanum kann verða klárt til januar 2016.

Útbyggingin hevur avleiðingar fyri parkeringsumstøðurnar á Hálsi og í Gundadali. Møguleiki er at útvega 130 nýggj parkeringspláss á lendinum framvið R.C. Effersøesgøtu. Hetta eigur at verða tikið við í hallarverkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fara undir sum fyrsta stig at prosjektera og fáa til vega útbjóðingartilfar av útbygging norðureftir 23m samsvarandi lýsingini omanfyri.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Nevndin samtykti at útvega kostnaðarmeting av hesi loysnini og at arbeitt verður við at staðseta og kostnaðarmeta eina heila høll á Gundadals-leiðini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í samskifti við Sp/f HMP Consult um eina tillagaða útgávu av BBP-verkætlanini, har tað tó verður hildið fast við verandi byggistíl o.a.

Til ber at realisera eina verkætlan við útbygging norðureftir við einum hálvum vølli, gera vestursíðuna uttan lidna, umframt útbygging suðureftir til judo, borðtennis, móttøkuøkið o.a. fyri 34,9 mio.kr. uttan MVG á 6,25%.

Mett byggitíð er eitt gott ár. Útboð uppá norður og vestursíðuna kann verða um ársskiftið og uppá suðursíðuna í mars. Neyðugt er við smærri tillagingunum í projekteringini av suður-verkætlanini. Til ber eisini at gera parkeringøki við 130 plássum í lendinum millum høllina og R.C. Effersøesgøtu fyri 4,15 mio.kr. umframt kommununar MVG á 6,25%.

Henda útbygging av Høllini á Hálsi og útbyggingin av høllini í Skúlanum á Argjahamri økir um tímatalið, sum til ber at brúka hallirnar til venjing. Sum støðan er í dag, eru 97 tímar at býta til flogbólt og hondbólt. Við at útbyggja á Argjum og á Hálsi verða 166 tímar tilsamans til hondbólt, flogbólt og kurvabólt.

Í Høllini á Hálsi koma í dag lið inn einaferð um tíman. Tá útbygt er, koma lið inn hvønn hálva tíma, tí tey hita upp á hálva vøllinum (útbygdi vøllurin) og fara síðan inn á heila vøllin (verandi vøllur), og tá kann næsta lið koma inn á hálva vøllin til upphiting og venjing. Mett verður, at hetta gevur uml 70% fleiri venjingartíðir, tí skipanin kann ikki nýtast til fulnar til liðini í fremstu deildunum, tí tey vanliga venja 1,5 tíma. Talan er sostatt um munandi meira fleksibla skipan.

Ein annar vinningur er, at tíðin millum dystir gerst styttri, tí størri parturin av upphitingini kann fara fram á hálva vøllinum.

Høllin á Hálsi er eitt slag av tjóðarítróttahøll og fer útbyggingin at styrkja um tann leiklutin innan ítróttin, umframt tað ymiska fjølbroytta mentanar- og handilsvirksemi sum annars er í høllini av og á. Haraftrat er Høllin á Hálsi valstað í býnum o.s.fr.

**Viðv. kostnaðarmeting og staðseting av heilari høll á Gundadalsleiðini**
Ein møguleiki er at byggja eina nýggja høll í økinum suður úr Tórsbreyt. Talan er um matr. 1393a ogn hjá P/F Eik Banka. Ein fult útbygd nýmótans høll ella hallardepil har fer at kosta væl meir enn avsetti kostnaðarkarmurin fyri bygging av ítróttahøllum, ið er tøkur, og sum ætlanin er at játta í 2016. Eisini má væntast, at henda ætlan ber ikki til at realiserað innan stutta tíð.

Hartil skal havast í huga, at í byggiverkætlanini fyri Skúlan á Fløtum er ein ítróttahøll við 400 áskoðaraplásum, sum partur av byggistigi 2, ið verður liðugt á sumri 2019. Haraftrat verður ein ítróttahøll í Marknagilsdeplinum, og er ætlanin at gera avtalu við depilin um at umsita part av hallartíðunum, tá depilin ætlandi er liðugur miðskeiðis í 2017.

Talva við tímum í høllunum er viðfest.
Kostnaðarmeting fyri útbygging av Høllini á Hálsi er viðfest.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at

- at heimila umsitingini at fara undir útboð av verkætlanini í sonevndum øvugtum útboði í eini heildararbeiðstøku innan fyri karmin á 34,9 mio.kr.,
- at heimila umsitingini at fara undir útboð av parkingsverkætlanini í einum útboði í heildararbeiðstøku innanfyri karmin á 4,15 mio.kr.
  og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Útsett til komandi fund.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Útsett.

**Ískoyti**

**Útbygging norðureftir av høll í fullari longd, kostnaðarmeting o.a.**
Umsitingin hevur samskift við Sp/f HMP Consult um eina tillagaða útgávu av BBP-verkætlanini í norðurendanum til fevna um eina høll í fullari longd (hondbóltsvøllur), har tað tó verður hildið fast við verandi byggistíl o.a. so vítt til ber, umframt aðrar betranir.

Til ber at realisera eina verkætlan við útbygging norðureftir við einum fullum vølli, gera vestursíðuna uttan lidna (og teimum umvælingum innandura, sum standast av hesum), men

ikki útbygging suðureftir til judo, borðtennis, móttøkuøkið o.a. fyri kr. 28,5 mió í handverkaraútreiðslum (HVÚ) u/mvg. Tá er eisini roknað 130 parkeringsplássum í lendinum millum høllina og R.C. Effersøes gøtu. Mett byggitíð er 18 mánaðir. Útboð uppá verkætlanina kann verða í apríl 2016, eftir at neyðug projektering er gjørd. Neyðugt er við ávísum tillagingum í áður gjørdari projektering av norðurverkætlanini.

Kostnaðarmeting og nærri greiningar fyri útbygging av Høllini á Hálsi eru viðfestar, umframt strikutekningar og visualiseringar (visualiseringar verða tøkar mikudagin).

**Nýtsluendamál og hallartímar**
Henda útbygging av Høllini á Hálsi, og útbyggingin av høllini í Skúlanum á Argjahamri økir munandi um tímatalið, sum til ber at brúka hallirnar til venjing. Sum støðan er í dag, eru 97 tímar at býta til flogbólt og hondbólt. Við at útbyggja á Argjum og á Hálsi verða 176 tímar tilsamans til hondbólt, flogbólt og kurvabólt. Verður bygt út við hálvari høll á Hálsi verða tímarnir til hondbólt, flogbólt og kurvabólt 166 tilsamans.

Tað vil siga at tey stóru feløgini(H71, Neistin, Kyndil og Fleyr) kunnu í grundreglum hava hvør sína høll og ÍA og kurvabólt feløgini kunnu deilast um eina høll.

Við heilum vølli afturat á Hálsi kunnu dystir eisini spælast har eins og á Argjahamri.

Um bygt verður sum víst er á tekningunum, verður stórt øki á eystursíðuni, sum kann brúkast til upphiting bæði til dystir og venjing, sum í dag fer fram í geingjunum, sum er óheppið. Eisini kunnu høllini á eystursíðuni brúkast t.d. til borðtennis o.a. umframt betri goymslumøguleikar.

Tá tiltøk verða í høllini so sum stevnur, møtir, jólasøla og onnur tiltøk sum bert skulu brúka eina høll kann venjast í hinari høllini meðan gjørt verður klárt til tiltøkini, tað vil siga at munandi minni avlýsingar verða hjá feløgunum.

Høllin á Hálsi er eitt slag av tjóðarítróttahøll, og fer útbyggingin at styrkja tann leiklutin. Haraftrat er Høllin á Hálsi valstað í býnum. Høllin kemur at hava pláss fyri umleið 1800 áskoðarum á verandi áskoðaraplássum, umframt tveimum áskoðarapallum, sum kunnu flytast. Hetta fer m.a. geva ítróttafeløgunum møguleika fyri at fáa væl størri inntøkur í sambandi við t.d. finalur í hondbólti og altjóða dystir.

**Judofelagið og borðtennisfelagið**
Judofelagið í Tórshavn hevur 26 íðkandi limir sbrt. yvirlitinum hjá ÍSF frá juni 2015, og í øllum landinum eru 66 íðkandi. Judofelagið venur og hevur kappingar í fimleikahøllini í Eysturskúlanum. Felagið hevur í løtuni 12 tímar um vikuna.
Eitt av teimum feløgunum, ið hevur ynski um betri og støðugari hølisviðurskifti, er Borðtennisfelagið Tór (t.e. borðtennisfelagið í Tórshavnar kommunu). Felagið hevur í løtuni 30 íðkandi sbrt. frágreiðingini hjá ÍSF frá juni 2015, og í øllum landinum eru 68 íðkandi.

Borðtennisfelagið hevur í dag venjingar í høllini í Skúlanum við Løgmannabreyt og í Eysturskúlanum. Borðtennisfelagið Tór hevur 12 hallartímar um vikuna. Felagið hevur stórt ynski um at fáa betri egnað høli til venjing, og at venjingin er á einum stað. Í øðrum tilmæli sæst at tilmælt verður at venjingar teirra verða staðsettar á Látrinum á Argjahamri.

Judofelagið og borðtennisfelagið hava hvør umleið 7 kappingar um árið í Havn. Ein umrøddur møguleiki fyri at skapa hesum ítróttagreinum betri umstøður er at útbygda høllin á Hálsi ognar sær máttur til judo og eini 8 borðtennisborð soleiðis at kappingar framyvir verða í

høllini á Hálsi og at Ítróttaanlegg tryggjar at alt er klárt til hesar kappingar í góðum kørmum, meðan judo framyvir venjur í høllini á Argjahamri ella heldur fram í Eysturskúlanum og borðtennisfelagið á Látrinum á Argjahamri.

**Býarskipanar- og myndugleikaviðurskifti**
Høllin á Hálsi er  fevnd av øki D2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu seinast broytt 31. oktober 2013. Innan karmar av byggisamtyktini eru rúmir møguleikar fyri bygging í økinum. Í økinum eru ikki nøktandi parkingsviðurskifti og er tí neyðugt innan 2017 at fáa gjørt fleiri parkeringspláss.

**Samlaði kapasiteturin innan ítróttaranlegg og fleirnýtsluendamál**
Hallarkapasiturin í Tórshavnar kommunu er sum heild tepur, og greitt er, at við stóru menningini innan ymiskar ítróttagreinar er tørvur á útbygging av kapasitetinum, og tørvur er á fleiri hallartímum.
Verandi nýtslustig er høgt, samstundis eru Ítróttaranlegg í holt við at fara ígjøgnum og eftirmeta skipanina við atliti at tryggja sær, at optimal nýtsla er av tøka tilfeinginum, t.d. at í fleiri førum er ein heil høll avsett, men bert hálv høll verður brúkt; at tað kemur meir enn so fyri, at ikki verður boðað frá, tá ein høll ikki verður brúkt.

Samanlagt ræður Ítróttaranlegg yvir 16 hallum í kommununi antin alt døgnið ella eftir kl. 16 og í vikuskiftum. Talan er umleið 12.000 $m^2$. av hallum, skiftingarrúmum vm.

Um nevnda útbygging verður framd,  verður *økt munandi* um tøku tíðirnar í skipanini til hondbólt, flogbólt, kurvabólt o.a.

**Rakstrarviðurskifti**
Øktir fermetrar í høllini fara at økja rakstrarútreiðslurnar hjá Ítróttaranleggum, men inntøkurnar av hallarleigu skuldu viga upp ímóti øktu útreiðslunum.

Samanumtikið verður mett, at nevnda íløga hevur høgt nyttuvirði og rímiligan kostnað í mun økta kapasitetin og gagnar ítróttinum, frítíðarendamálum og øðrum virksemi, sum er í høllini.

Skjøl eru viðfest.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at
- at heimila umsitingini at fara undir útboð av útbygging av høllini  og parkeringsøki í sonevndum øvugtum útboði í eini heildararbeiðstøku innan fyri karmin á kr. 28,5 mió HVÚ u/mvg
  og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 25. november 2015:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um figgjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at verkætlanin verður víðkað til eisini at umfata hølir til judo og borðtennis, og at beina málið í býráðið.

**Ískoyti**
Sum uppfylging uppá viðgerðina í fíggjarnevndini 2. desember 2015 hevur umsitingin

fyrireikað ískoytisverkætlan viðv. hølum serliga ætlað til judo og borðtennis, umframt ta útbygging, ið longu er viðgjørd og samtykt í nevndini.

Mett verður sannlíkt, at til ber at gera ein kjallara á uml. 400 m2 undir norðurskjøldrinum í útbygdu dupulthøllini fyri umleið 6,4 mio.kr. Kjallarin kann hýsa judo og borðtennis. Harumframt kann verða talan um onnur endamál, alt eftir nær og hvussu nógv hølini verða brúkt til høvuðsendamálini. Málið er, at judomáttur til ein vøll liggja frammi, uttan so at onkur heilt serligt orsøk ger seg galdandi. Á henda hátt fær judo fastar karmar kring virksemið. Viðv. borðtennis verður møguleiki fyri, at fleiri borð kunnu standa fast frammi, og fær borðtennis soleiðis støðugar og framúr karmar. Ætlandi skal virksemið hjá hesum ítróttagreinunum kunna samvirka í ávísan mun. Sp/f HMP hevur projekterað verkætlanina á Hálsi higartil.

Nærri tekningar og útgreinað kostnaðmeting verður tøk mánadagin.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Sp/f HMP Consult við atliti til at liðugprojektera hallarútbyggingina, sum áður samtykt 25. november 2015, umframt við hesum ískoyti viðv. útbygging í kjallaranum og venda aftur til mentamálanevndina og fíggjarnevndina við einum samráðingarúrsliti primo januar 2016.

**Mentamálanevndin 07. december 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. december 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Sp/f HMP-consult og er nú sáttmáli klárur um projektering. Sí hjálagt sáttmálauppskot, ið lýsir viðurskiftini nærri.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at staðfesta sáttmálauppskotið og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevin Sp/f HMP Consult hevur gjørt klárt projektuppskot til byggiverkætlanina íroknað anleggsarbeiði viðv. parkeringsøkinum. Verkætlanarbólkur fyri útbygging av høllini á

Hálsi hevur verið við í tilgongdini og mælir til at góðkenna hjálagda projektuppskot. Sí hjáløgdu skjøl.

Í mun til áður gjørdar metingar er talan um ávísan mun á metta kostnaðinum, men verður mett at talan er um innanfyri ta óvissu, ið vil verða í sambandi við slíkar metingar og sum endaligu arbeiðstøkurnar vilja staðfesta nærri. Fyri at koma til nevndu kostnaðarmeting eru gjørdar ein røð av tillagingum, ið tó ikki broyta grundleggjandi uppá verkætlanina.

Við støði í projektuppskotinum fer ráðgevin beinanvegin undir at detailprojektera verkætlanina. Ætlandi verður detailprojekteringin fyri jørðarbeiðið klár um stutta tíð, soleiðis at jørðarbeiðið longu verður klárt at bjóða út innan 2-3 vikur. Ætlanin er at tilboð uppá jørðarbeiðið eru innkomin og klár til nevndarviðgerð 6. apríl 2016.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja hjálagda projektuppskot.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Útbyggingin av høllini á Hálsi og nýtt parkeringsøki móti R.C. Effersøesgøtu, er sum áður ætlað at bjóðað út í tveimum. Fyrst jørðarbeiði íroknað parkeringsøki og síðani bygningsarbeiði. Bygningsarbeiðið verður væntandi bjóðaði út um mánaðarskifti maj/juni.

Útboð hevur verið av jørðarbeiðinum í sambandi við verkætlanina. Týsdagin tann 5. apríl kl. 11:00 var lisitatión hildin. Fýra arbeiðstakarar vóru bidnir um at bjóða, og allir lótu tilboð inn.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 10.648.010,00 |
| P/F J&K Contractors | kr. 9.067.613,00 |
| Sp/f Plan | kr. 10.167.628,70 |
| Sp/f TG Verk | kr. 11.248.229,00 |
| | |
| Metingin segði | kr. 7.950.000,00 |

Ikki íroknað MVG.

Við í arbeiðinum varð bjóðað út gravir vm. til fjarhitaleiðing. Ynski um fjarhita er komið inn seinni í verkætlanina, sum ein meirkostnaður.

Parturin í innkomna tilboðnum til jørðarbeiði, sum knýtir seg til fjarhitaskipan, er kr. 391.012,00.

Hvussu stórur partur fjarhitakostnaðinum verkætlanin skal rinda og hvussu stórur partur Fjarhitafelagið skal rinda, er ikki avgreitt enn, men er til samráðingar.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at farast kann undir samráðingar um sáttmála um jørðaarbeiðið til útbygging av høllini á Hálsi og tilhoyrandi parkeringsøki við lægsta tilboðsveitara, ið er P/F J&K Petersen Contractors, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið og samtyktina omanfyri. Av misgáum er ikki biðið um heimild at gera sáttmála, tá samráðing er liðug at leggja fyri fíggjarnevninda. Sáttmáli væntast klárur til fíggjarnevndarfundin, og tí verður biðið um heimild til eisini at gera sáttmála.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at, at farast kann undir samráðingar og at gera sáttmála um jørarbeiðið við lægsta tilboðsveitara at leggja fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at gera sáttmála við P/f J&K Contractors og at játta kr. 9.101.547 umframt mvg. av framfluttum løgukarmi, 5775, til L 57003, høllin á Hálsi, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016: Einmælt samtykt.**
**Ískoyti**
Á karminum fyri 2016 eru játtaðar 20. mio.kr. á stovnsnr. 5775 – Ítróttaanlegg (íløgur). Projekteringin av útbyggingini av Høllini á Hálsi er nærum liðug og verður byggiarbeiðið boðið út í innbodnari lisitatión (3 fak) í næstum, umframt at jørðarbeiðið og gerð av parkeringsplássi við Skipara Hansens stein longu er í gongd.
**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at játta 20. mio.kr. á projektkonto L57003, umframt at flyta játtanina á projektkonto L57021 – Ítróttahøll í Gundadali - 1,686 mio.kr. og á projektkonto L57023 – Judo og borðtennishøll – 2,0 mio.kr til projektkonto L57003 – Høllin á Hálsi.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 165/16 Samstarvsavtala við Sandoy um barnatannrøkt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 07.03.2016 | 13/16 | 16/01195-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 30.05.2016 | 34/16 | 16/01195-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 226/16 | 16/01195-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 165/16 | 16/01195-1 |

**Málslýsing:**
Kommunurnar í Sandoynni hava vent sær til Tórshavnar kommunu um samstarvsavtalu viðvíkjandi barnatannrøkt, harundir eisini sertannlæknaviðgerðir.

Sum kunnugt hava kommunurnar lógarskyldu at veita ókeypis barnatannrøkt og sertannlæknaviðgerðir til børn og ung 0-17 ár.

Í Sandoynni er talan um uml. 300 børn. Gjørdar eru metingar um dagføringartørvin á klinikkini á Meginskúlanum á Sandi, starvsfólkatørv eins og kostnaðin fyri tænasturnar.

Uppskot til samstarvsavtalu verður gjøgnumgingið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til heimild at samráðast við kommunurnar í Sandoynni at leggja aftur fyri nevndina.

**Trivnaðarnevndin 07. marts 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gjørt er endaligt uppskot um samstarvsavtalu millum Tórshavnar kommunu og Sandoyar Skúlasamband, sum hevur ábyrgd av barnatannrøktini í Sandoynni.

Meginreglurnar í hesi avtalu eru:
- At vanliga barnatannrøktin fer fram í tannlæknahølinum í Meginskúlanum á Sandi, men at børn og ung, sum eru borgarar í Sandoynni, men dagliga ganga í skúla í Havn, kunnu eftir ynski verða viðgjørd í hølum hjá barnatannrøktini í Havn.
- Sandoyar Skúlasamband skal tryggja, at tannlæknahølið í Meginskúlanum verður dagført eftir tilráðing frá barnatannrøktini í Havn, og skal bera kostnaðin av hesum.
- Sandoyar Skúlasamband tekur sær eisini av viðlíkahaldi av tannlæknahølinum í Meginskúlanum, bæði innan og uttanfyri, og skal bera kostnaðin av hesum.
- Fyri at kunna bjóða eina nøktandi barnatannrøktartænastu í økinum, verður mett neyðugt við hesum starvsfólkanormeringum: 0,2 tannlækni, 0,6 klinikkassistentur og 0,2 tannrøktari.
- Starvsfólkini verða sett av Tórshavnar kommunu, og innganga sum onnur starvsfólk í barnatannrøktini í Tórshavnar kommunu. Arbeiðsstaður teirra verða allir stovnar og allar deildir hjá Tórshavnar Kommunu. Arbeiðsplássið verður í høvuðsheitum á tannlæknastovuni í Meginskúlanum á Sandi.

- Børn og ung í Sandoynni verða eisini fevnd av sertannlæknatænastuni (ortodonti) í Tórshavnar kommunu. Tó so, at sertannlækna tænastan er treytað av, at Tórshavnar kommuna sjálv hevur eina sertannlæknaskipan.
- Tórshavnar kommuna stendur fyri keyp av vørum og tænastum.
- Sandoyar Skúlasamband ber allar kostnaðir av hesi avtalu, sum kann útgreinast soleiðis:
    - Dagføring av tannlæknahølunum í Meginskúlanum kr. 630.000
    - Samlaður lønarkostnaðir, rakstur og sertannlækaviðgerð kr. 2.173 pr. barn (2016)
    - Sandoyar Skúlasamband ber árliga kostnaðin av viðlíkahaldinum av hølunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin av barnatannrøktini mæla til at taka undir við uppskotinum til samstarvsavtalu við Sandoyar Skúlasamband at byrja skúlaárið 2016/17.

**Trivnaðarnevndin 30. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 166/16 Umsókn um framhaldsdeild í Sankta Frans skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 43/16 | 15/04635-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 165/16 | 15/04635-3 |
| 3 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 166/16 | 15/04635-3 |

**Málslýsing:**
**Málslýsing:**
Skúlastýrið í Sankta Frans skúla søkir í skrivi dagfest 26. november 2015 um, at 8. og 9. flokkur verða í Sankta Frans skúla, tvs. at Sankta Frans skúla verður ein tví- sporðaur skúli við næmingum úr forskúla til 9. flokk.

Í umsóknini frá skúlastýrinum stendur m.a. viðvíkjandi hølisviðurskiftum: «*Vit hava spurt okkum fyri hjá leiðslu skúlans, hvussu skúlin kann hýsa framhaldsdeild undir verandi kørmum. Svarið var, at tríggjar serstovur eru tøkar, sum kunnu nýtast sum flokshøli. Alisfrøðistovan, tónleikastovan og handarbeiðisstovan.*

*Tískil ber til at byrja við framhaldsdeild í august 2016, tí í ár er bert ein 7. flokkur (sí skjal 2 – teldupostur frá næmingunum í núverandi 7. flokki)  Skúlaárið 2017/18  koma 2 flokkar afturat. Í august 2018 verða umstøðurnar ikki heilt nøktandi, men tað ber til. Ynskiligt er tó, at  vit frá august 2019 hava funnið eina varandi loysn.Tað átti ikki at verið ein trupulleiki, tí fleiri bygningar fara at standa tómir um nøkur heilt fá ár. Bygningurin í Kongagøtu er eitt uppskot, sum hevði givið skúlanum góðar møguleikar at skapa eitt gott umhvørvi, har børn og ung trívast.*»

7. flokkur í Sankta Frans skúla hevur sett ynski fram um at halda fram í skúlanum í 8. flokki næsta skúlaár.

**<u>Gongdin viðvíkjandi skúlabygnað</u>**
24. november 2011 samtykti býráðið at leggja álitið um skúlabygnað fyri skúlastýrini og at seta arbeiðsbólk umboðandi øll skúlastýrini og kommununa at viðgera bygnaðaruppskotið.

Í apríl 2012 varð mentamálanevndin kunnað um niðurstøðurnar. Bólkurin tók m.a. undir við, at nýggjur skúli verður bygdur í vesturbýnum í staðin fyri Venjingarskúlan og Kommunuskúlan, og at skúlarnir verða lagdir saman í ein skúla.

30. apríl 2012 arbeiðsbólkur settur at viðgera uppskot um nýggjan skúla í vesturbýnum, niðurstøður í juni 2012.

Býráðið tók undir við skúlabygnaðinum, og í oktober 2012 varð umsókn send MMR, sum í februar 2013 ikki góðkendi uppskotið um nýggjan skúlabygnað.

Í juni 2013 varð samtykt at gera eina verkætlanar- og tørvslýsing fyri miðbýarskúla og vesturskúla. Hon var liðug í september 2013.

Sambært uppskoti 4 í tørvslýsingini fyri miðstaðarøkið er skúlabygnaðurin fyri økið hesin:

| Skúli | Forskúli | 1.-7. flokkur | 8.-9. flokkur | Frítíðarskúli |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Eysturskúli | 2 | 2 | 3 | Forsk.fl.-2. fl. |
| Miðbýarskúli | 2 | 2 | 0 | Forsk.fl.-2. fl. |
| Vesturskúli | 2 | 2 | 4 | Forsk.fl.-2. fl. |
| **Spor** | **6** | **6** | **7** | |

9. oktober í 2013 samtykti mentamálanevndin at taka undir við uppskoti 4 og heita á umsitingina at útgreina bygnað og bygging.

22.mai í 2014 samtykti býráðið, at vesturskúlin skal hava trý-spor í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. árgangi.

Í juni 2014 varð samtykt at at leggja Tórshavnar Kommunuskúla og Venjingarskúlan bygnaðarliga saman frá 1. januar 2015, og umsókn um hesa bygnaðarbroyting varð send MMR, sum í september 2014 góðkendi hesa bygnaðarbroyting. Samanlagdi skúlin eitur nú Skúlin á Fløtum.

28.september í 2014 góðkennir MMR bygnaðarbroytingina

21. oktober í 2015 samtykti býráðið byggiskránna fyri Skúlan á Fløtum.

Sostatt er hetta skúlabygnaðurin fyri miðstaðarøkið:

| **Skúli** | **1.-7. flokkur** | **8.-9. flokkur** |
|---|---|---|
| Eysturskúli | 2 | 3 |
| Miðbýarskúli | 2 | 0 |
| Vesturskúli | 3 | 5 |
| **Spor** | **7** | **8** |

**Lógargrundarlag**

Sambært § 32 í fólkaskúlalógini skal ein skúlabygnaður verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi. Sambært § 47, stk. 6 ger kommunustýrið uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum. Sambært § 57, stk. 5 skal landsstýrismaðurin góðkenna skúlabygnaðin fyri einstøku skúlarnar og møguligar broytingar í teimum.

Sambært § 52, stk. 3 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúla-bygging/- umbygging. Í teimum kommunum har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk at viðgera uppskot um skúlabygging/umbygging, smb. § 57, stk. 4.

Sambært § 52, stk. 4 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum. Í teimum kommunum har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk, umboðandi øll skúlastýrini, at viðgera uppskot um skúlabygnað, smb. § 47, stk. 6.

Í hesum føri hevur skúlastýrið fyri Sankta Frans skúla søkt um bygnaðarbroyting, men henda broyting ávirkar eisini bygnaðin í Skúlanum á Fløtum, sostatt eigur skúlastýrið har eisini at viðgera uppskotið, um so er at kommunustýrið tekur undir við umsóknini frá skúlastýrinum. Síðani verður umsókn send landstýrismanninum, sum endaliga góðkennir skúlabygnað fyri einstøku skúlarnar og broytingar í honum.

Skúlabygnaðurin í Tórshavnar kommunu er viðgjørdur í arbeiðsbólki umboðandi øll skúlastýrini, og øll skúlastýrini vóru við at gera tilmæli um skúlabygnað, tí er kanska í hesum føri rættast, at uppskotið um hesa broyting í bygnaðinum eisini verður løgd fyri øll skúlastýrini, hóast broytingin bert ávirkar tveir skúlar.

**Hølisviðurskifti**
Tað er ikki pláss fyri fýra flokkum aftrat í Sankta Frans skúla, men skúlin vísir á, at tað ber til at hava 8. flokk næsta skúlaár, tí tað eru bara 20 næmingar í núverandi 7. árgangi. Umframt hetta metir skúlin, at ein fyribilsloysn kann vera, at tríggjar serstovur verða nýttar til flokshøli. Men frá  august 2018 verða umstøðurnar ikki heilt nøktandi, men tað ber til. Skúlin ynskir at fáa fleiri hølir og nevnir møguleikan a fáa Skúlan Í Kongagøtu. Hann er tøkur í august 2020, tá tá 3. byggistig í Skúlanum á Fløtum verður tikið í nýtslu.

Í Sankta Frans skúla eru serhøli, men tónleikur húsast í gomlu kirkjuna, og tað hølið er ikki nøktandi. Haraftrat er neyðugt at víðkað umstøðurnar í alis- og evnafrøði til 8. og 9. flokk.

Bókasavnið í Skúlanum er til næmingar upp til og við 7. flokki, so neyðugt verður at útbyggja tað og fáa til vega tilfar til eldri næmingar eisini.

Sankta Frans skúli hevur sum er tørv á høvuðsumvæling innan nøkur ár. Í 2011 varð mett, at høvuðsumvælingin kostaði uml. 31 mió kr. við dagføring var kostnaðarmetingin uml. 73 mió kr. Í vár fer mentamáladeildin saman við teknisku fyrisiting at dagføra metingar í sambandi við gerð av langtíðar fíggjarætlan.

Skal Sankta Frans skúli hava 8. og 9. árgang í skúlanum er neyðugt antin útbyggja skúlan ella fáa fleiri høli, og tað kundi so verið Skúlin í Kongagøtu.

**Stovningarútreiðslur**
Við støði í stovningaútreiðslunum til Hoyvíkar skúla í 2009, tá 8. flokkur byrjaði har, verður mett, at stovningaútreiðslurnar ísv. tilfar og útgerð til 8. og 9. flokk eru umleið 800.000 kr. Her er KT-útgerð ikki tikin við.

**Miðbýarskúli**
Sankta Frans skúli er miðbýarskúlin (smábarna- og barnaskúli) við næmingum í forskúla – 7. flokk. Hann er ein av tveimum skúlum, sum hevur forskúla, og fleiri næmingar, sum verða skrivaðir inn í forskúlan halda fram í skúlanum, hóast teir ikki búgva í miðbýnum ella nærindis. Skúlaárið 2015/2016 er næmingatalið í skúlanum 320.

8.  og 9 fl.
Fyrimunir:
- Næmingarnir sleppa undan at skifta skúla eftir 7. fl.
- Fleiri ung er í miðbýnum
- Lærarar kenna næmingarnar frá forskúla
- Lærarar til allar deildir

Vansar:
- Næmingarnir verða ikki partur av størri eind í 8. og 9. fl.
- Færri valmøguleikar

- Færri lærarar sum burtur av undirvísa í teirra lærugreinum
- Hádeildin í Skúlanum á Fløtum verður minni og ætlanirnar við skúlabyggingini munandi broyttar

**Skúlin á Fløtum**
Eftir at byggiskráin fyri Skúlan á Fløtum varð samtykt tann 21. oktober 2015, varð hugskotskapping um Skúlan á Fløtum útskrivað, og býráðið hevur á fundi 6. januar í inniverandi ári heimilað umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið.

Verður umsóknin um broyttan skúlabygnað fyri Sankta Frans skúla samtykt, kann væntast, at verkætlanin fyri Skúlan á Fløtum verður seinkað, tí so skal skúlin broytast frá fimm sporum niður í trý í 8. og 9. flokki, og verkætlanin lagast til tað. Tíðarætlanin fyri Skúlan á fløtum er knøpp, og seinkingar av hesum slag kunnu gera, at trupult verður at halda tíðarætlanina.

**Størri eindir**
Í sambandi við arbeiði við skúlabygnað hevur dentur verið lagdur á størri eindir, serliga í hádeild, við tí fyri eygað at skapa eitt sterkari fakligt umhvørvi, fleiri valmøguleikar hjá næmingum og eitt breiðari sosialt umhvørvi í hádeild. Verður hádeildin í Skúlanum á Fløtum minkað við í miðal 100 næmingum, so verður stórur partur av tí fakliga profili, sum Skúlin á Fløtum stendur á, at falla til jarðar.

**Samanumtikið**
Uppskotið um 8. og 9. flokk í Sankta Frans skúla er ímóti teimum samtyktum um skúlabygnað, sum eru framman undan, har hetta ynski skúlans eisini varð viðgjørt og fekk ikki undirtøku millum skúlastýrini og í býráðnum. Hølisviðurskiftini í Sankta Frans skúla eru ikki nøktandi til 8. og 9. fl. Uppskotið samsvarar ikki við samtyktu byggiskránna fyri Skúlan á Fløtum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla frá at broyta skúlabygnaðin fyri Sankta Frans skúla.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Halla Samuelsen, mælir til at taka undir við tilmælinum.

Meirilutin Halla Samuelsen, Sigrún Mohr og Helena Dam á Neystabø heldur at Sankta Frans skúli er ein framúr barnaskúli við forskúla og upp til 7. flokk. Og fer meirilutin at virka fyri at umstøðurnar hjá Santa Frans Skúla verða betraðar og dagførdar, so at skúlin kann menna sítt virksemi sum ein av fremstu barnaskúlum og miðbýarskúlin í Havn. Meirilutin heldur tað tó ikki vera rætt at fara undir at broyta skúlabygnaðin nú, sum er samtyktur sambært øllum lógarásettum mannagongdum av samdum býráði og av øllum býráðslimum í fleiri umførum, og góðkendur av Mentamálaráðnum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til at loyva framhaldsdeild í Sankta Frans skúla, meðan bygt verður úti á Fløtum.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Týsdagin 18. mai 2016 skipaðu foreldur í Sankta Frans skúla fyri pallborðsfundi um framhaldsdeild í skúlanum. Niðurstøða á fundinum varð, at umsóknin um framhaldsdeild í Sankta Frans skúla skuldi viðgerast einaferð enn.

Skal framhaldsdeild skipast í Sankta Frans skúla, so er sambært fólkaskúlalógini talan um bygnaðarbroyting, og mannagongdin í fólkaskúlalógini um bygnaðarbroytingar skal so fylgjast. Í hesum føri skal sostatt arbeiðsbólkur við umboðum fyri øll skúlastýri í Tórshavnar kommunu setast, og tað hevur harumframt sum fortreyt, at tað er kommunustýrið, ið skal seta arbeiðsbólkin í gongd. Tað merkir aftur eina nevndar- og býráðsviðgerð fyrst, har arbeiðssetningur skal samtykkjast og bólkurin mannast. Hetta tekur rúma tíð, og tað er als ikki sannlíkt, at tað kann bera á mál innan summarið.

Viðvíkjandi spurninginum royndarskipan er tað galdandi, at sambært fólkaskúlalógini er einki grundarlag at gera framhaldsdeild sum royndarverkætlan. Hetta kemur ikki undir treytirnar fyri royndarverkætlan, tí talan er ikki um roynd av nøkrum nýggjum. Sagt við øðrum orðum, tað er einki nýtt í at vaksa ein skúla úr sjey floksstigum upp í 9.

Um farið verður undir viðgerð av málum viðvíkjandi skúlabygnaði, verður mett viðkomandi at viðgera eina røð av spurningum innan skúlabygnað um somu leið, tí talan er um eina heild, ið er samansett av fleiri staklutum, ið ávirka hvørt annað. Eitt nú spurningurin um forskúla sum standardtilboð, staðseting av Nám X og sertilboðum, skiftið til hádeild úr smáu skúlunum vm. Eisini má metast greitt, at framhaldsdeild í Sankta Frans skúla hevur avleiðing fyri byggiverkætlanina á Fløtum, sum tá skal tillagast færri sporum í framhaldsdeildini har.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini frá at broyta skúlabygnaðin fyri Sankta Frans skúla.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við tilmælinum og vísir til sína støðu á fundinum 10. februar 2016.

Ein annar minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge, býráðslimur, biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

Miðbýarskúli:
Við støði í samtykt hjá meiriluta í mentamálanevndini 10. februar 2016 um at menna Sankta Frans skúla sum framtíðar miðbýarskúla, verður við hesum skotið upp at seta serstakan arbeiðsbólk umboðandi skúlastýrini fyri Sankta Frans skúla, Skúlan á Fløtum og Eysturskúlan við hvør sínum umboði og einum umboði fyri mentamáladeildina at viðgera og gera tilmæli um niðanfyri standandi:

1. Uppskot til skúlabygnað fyri framtíðar miðbýarskúla, herundir møguliga framhaldsdeild, ið eisini tekur atlit at skúlabygnaðinum í kommununi annars, umframt atknýttum tilboðum so sum forskúla, frítíðarskúla og klubbtilboði.

2. Uppskot til, hvussu skúlabygningar í miðbýnum kunnu nøkta hølistørvin samsvarandi pkt. 1, herundir tørv á møguligum dagføringum og umvælingum.

Arbeiðsbólkurin skal setast í gongd beinanvegin og lata tilmæli í seinasta lagi 30. november 2016. Tilmælið verður latið øllum skúlastýrunum at viðgera samsvarandi fólkaskúlalógini § 52, stk. 4, og sum síðani og í seinasta lagi 1. mars 2017 letur býráðnum sítt tilmæli.

Jógvan Arge legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Sum liður í ætlanum fyri skúlaskapin í miðbýnum í Havn, samtykkir býráðið fyri sín part at stovna framhaldsdeild í miðbýarskúlanum Sankta Frans sum skjótast.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið hjá Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri vóru: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Elin Lindenskov, Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal greiddu ikki atkvøðu.

# 167/16 Umsiting og býráð flyta út á Vestaru Bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 24.09.2015 | 30/15 | 15/03660-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 202/15 | 15/03660-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 136/15 | 15/03660-1 |
| 4 Vinnunevndin | 12.10.2015 | 35/15 | 15/03660-1 |
| 5 Vinnunevndin | 14.10.2015 | 38/15 | 15/03660-1 |
| 6 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 174/15 | 15/03660-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 235/15 | 15/03660-1 |
| 8 Vinnunevndin | 18.04.2016 | 17/16 | 15/03660-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.04.2016 | 154/16 | 15/03660-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 190/16 | 15/03660-1 |
| 11 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 167/16 | 15/03660-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 23.05.2016 | 193/16 | 15/03660-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Fyrisitingin hjá kommununi húsast í dag í 5 bygningum í miðbýnum. Talan er um gamla Føroya Bankabygningin í Niels Finsens gøtu, Káta hornið, Meiaríið, Gamla posthúsið og Ráðhúsið. Í sambandi við keypið av bankabygninginum varð avgerð tikin um, at deildirnar hjá miðfyrisitingini, sum í dag eru í Káta Horninum, Meiarínum og Posthúsinum, skulu flyta í niðaru hæddirnar í Niels Finsensgøtu, har tekniska fyrisiting er í ovaru hæddunum.

Uppskot er, at allar fyrisitingarnar flyta úr nevndu bygningum í miðbýnum í tað, sum nú verður nevnt Sjóvinnuhúsið á Vestaru bryggju, og at nevndu bygningar undantikið Ráðhúsið verður seldir ella leigarir til annað virksemi í miðbýnum.

Fyri umsitingina eru fleiri fyrimunir at savna allar fyrisitingarnar og starvsfólkini har. Til ber at betra munandi um hølisviðurskiftini hjá flest øllum deildum og starvsfólkum, serliga í mun til serfunktiónir. Umframt at tryggja besta arbeiðsumhvørvi og starvsfólkatrivnað ber til at effektivisera arbeiðsgongdir serliga í mun til samstarv um tvørgangandi mál, so at politikkarar, borgarar, vinnulív og samstarvsfelagar annars fáa eina betri tænastu.

Kanningar eru gjørdar, sum staðfesta, at umsitingin hjá Tórshavnar kommunu kann rúmast í 2 til 2½ hæddum í sonevnda Sjóvinnuhúsinum, tvs. tær 2-3 ovastu hæddirnar. Ein fyribils mettur kostnaður at flyta starvsfólkini í hesi høli á Vestaru bryggju liggur á uml. kr. 3 mió. Hesin kostnaðurin er mettur sum íløga pr. starvsfólk á kr. 20.000.

Neyvari kanningar eiga tó at verða gjørdar av ítøkiliga tørvinum hjá ymisku deildunum í umsitingini.

Leigukostnaðurin er lýstur í niðanfyri standandi talvu. Við einum ásettum fermetraprísi á kr. 1.295,84, vil árligi leigukostnaðurin fyri hædd 5 og hædd 4 verða kr. 2.680.543,45. Um tørvurin vísir, at neyðugt verður við eini hálvari hædd afturat, hetta fyri at lúka øll krøv til nøktandi arbeiðsumstøður, so økist leigukostnaðurin samsvarandi.

| Dømi TK | | |
|---|---|---|
| | Starvsfólkatal | 140 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Skrivstovufermetrar | 1.550 | 2.239.750,00 |
| | Hædd | 4 og 5 | |
| | Goymslufermetrar | 0,00 | 0,00 |
| | Hartil felagsøki í % | 22,97 | |
| | Felagsøki í $m^2$ | 518,58 | 440.793,45 |
| | Kr. pr. ár | | 2.680.543,45 |
| | Árlig leiga pr. $m^2$ | | 1.295,84 |
| | Kr. pr. mðr. | | 223.378,62 |
| | Kr. pr. starvsfólk pr. mðr. | | 1.595,56 |

<u>Býráðssalur</u>:
Møguleiki er at byggja nýggjan býráðssal ovast í saltsilobygninginum á Vestaru bryggju, sum í løtuni verður umvældur í sambandi við høvuðsumvælingina av Sjóvinnuhúsinum.

Verandi býráðssalur í gamla meinigheitshúsinum er hvørki tíðarhóskandi ella nøktandi til vaksandi virksemið hjá býráðnum. Við at byggja nýggjan býráðssal ovast í saltsiloiini á Vestaru bryggju, ber til at bjóða borgaranum og politikarunum ein virðiligan sal við nútímans tøkni- og arbeiðsmøguleikum, har møguligt eisini verður at síggja runt allan sjónarringin bæði innanífrá og uttanífrá.

Tórshavn er, sum navnið sigur, ein havnabýur. Harumframt er Tórshavn eisini høvuðsstaður, og sum ein avleiðing av hesum umsitingarliga háborgin hjá føroysku tjóðini. Støddin og leikluturin sum høvuðsstaður leggur upp til eina virðiliga støðutakan til fólkaræðið eisini í byggilistini. Søguligi silobygningurin vil, við at verða innrættaður sum býráðssalur í eini byggilistarligari umskriving av bygninginum til ein vita, fáa ein nýggjan samleika sum fólkaræðisligur viti í norðuratlantshøvum.

Samanlagdi kostnaðurin at laga bygningin til býrðáðssal íroknað útgerð og innbúgv er mettur til kr. 18,3 mió.

Tað, at býráðssalur og umsiting eru í sama bygningin, gevur stórar fyrimunir eisini fyri politiska arbeiðið. Umframt at vera býráðssalur, fær hølið saman við fyrilestrarsalinum í hæddini undir funktión sum auditorium ætlað til framløgur og størri politiskar fundir, seminar v.m. Hesir møguleikar eru ikki til staðar á Vaglinum.

<u>Tíðarætlan</u>:
- Ítøkiliga kanningin at nágreina hølistørv til tær ymsu deildirnar kann setast í verk í oktober 2015.
- Arbeiðið at tillaga bygningin til hesa nýtslu kann síðani verða sett í verk, tá bygningurin er liðugur fyrst í 2015.
- Arbeiðið at tillaga ovasta part av saltsiloini til býráðssal kann byrja 1. Oktober 2015 og verða liðugt at takaí nýtslu á ólavsøku 2016.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til, at
- allar fyrisitingarnar verða fluttar í Sjóvinnuhúsið á Vestaru bryggju treytað av, at nøktandi fermetrar verða settir av til tess at lúka allan neyðugan hølistørv
- at arbeiðið til hetta, uml. kr. 3 mió, verður fíggjað við at umraðfesta verandi íløgur.

Stjórnin mælir harumframt til

- at byggja nýggjan býráðssal ovast í saltsilobygninginum á Vestaru bryggju, og
- at arbeiðið at tillaga bygningin kr. 18,3 mió í fyrstu atløgu verður fíggjað við at umraðfesta verandi íløgur og við einum parti av meirinntøkunum, tá hesar eru staðfestar. Alternativt kann íløgan eisini fáast til vega við søluni av bankabygninginum í Húsagøtu, tá hon er staðfest.

**Vinnunevndin 24. september 2015:**
Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr samtykkir at Tórshavnar kommuna sleppir at leiga hølir í Sjóvinnuhúsinum samsvarandi tilmælinum hjá stjórnini.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir fyri læstum hurðum 30. september 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá borgarstjóranum, um at beina málið í Vinnunevndina, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Vinnunevndin 12. oktober 2015:** Útsett.

**Vinnunevndin 14. oktober 2015:**
Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson og Bjørghild Djurhuus samtykkir at leggja dekk í saltsiloina og játta 3,5 mió. kr. av íløguætlanini hjá Tórshavnar havn fyri 2016.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við meirilutanum.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen, samtykkja at játta kr. 3,5 mió. av íløgukarminum hjá Tórshavnar Havn 2015 til at leggja dekk í saltsiloina og soleiðis tryggja møguleikan fyri framtíðar virksemi ovast í bygninginum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við meirilutanum.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 3 ímóti at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Bogi Andreasen.

Ímóti atkvøddu: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

**Ískoyti:**
Tað hevur tikið langa tíð at finna tað røttu loysnina til at leggja dekk í siloina. Hetta ger, at tað kann koma út í oktober, áðrenn arbeiðið at gera siloina verður liðugt.

Um arbeiðið ikki verður liðugt fyrr enn í oktober, kemur hetta at viðføra meirútreiðslur.

Um avgerð verður tikin um, at dekkið ikki verður lagt í, kann arbeiðið helst verða liðugt til ólavsøku, og møguleiki er fyri at játtanin heldur.

Tað vóru játtaðar 3,5 mió til bygging av dekki, av hesum eru kr. 800.000 brúktar til projektering, fyrireiking og seinking.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður frá at leggja dekkið í, og at afturføra 2,7 mió til samlaða íløgukarmin hjá Tórshavnar havn.

**Vinnunevndin 18. april 2016:**
Sjúrður Olsen og Jákup Dam taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Jákup Dam vísir eisini til samtykt í vinnunevndini 14. oktober 2015.

Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. april 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 23. maj 2016:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge taka undir við tilmælinum hjá havnarmeistaranum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson taka støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, og ongari ímóti.

Tey, sum atkvøddu fyri vóru: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Helena Dam á Neystabø og Tróndur Sigurðsson greiddu ikki atvkøðu.

# 168/16 Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 114/16 | 16/00407-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 163/16 | 16/00407-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 131/16 | 16/00407-3 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 151/16 | 16/00407-3 |
| 5 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 168/16 | 16/00407-3 |

**Málslýsing:**
Talan er um framhald av máli nr. 14/03366 – Samlað útbjóðing av undirhondsboð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík og útstykking við Djúpagil í Hoyvík – oman gil, ið aftur er framhald av málunum nr. 14/000714 – Staðseting av fótbóltsvølli í Hoyvík – Dalurin langi bóltvøllur (2010-0498) og máli nr. 14/01462 - Nýggjur fótbóltsvøllur í Hoyvík.

Arbeiðið við at gera fótbóltsvøllin verður ætlandi liðugt innan 2 mánaðir. Í verandi verkætlan er ikki íroknað graslíki, umframt undirlag (t.e. skerv, asfalt, sand, innfill, stoytdoyvingarlag), ið er neyðugt fyri at fáa ein vøll eftir nútíðans krøvum.

Í verandi verkætlan er ymiskt, ið ikki er íroknað verkætlanina, umframt graslíkisvøllin, eitt nú kloakkleiðingar við tilhoyrandi brunnum, el-arbeiðið, gittarmastur til vallarljós, áskoðarapláss, lendisjavning, betongtrappa, gøta og hegn, innkoyring og parkering frá Karlamagnusarbreyt, útskriftingarbenkur o.a. Tá verkætlanin er liðug verður nærri greitt hvat er eydnast at fáa við av hesum innanfyri verandi fíggjarkarm.

Tíðarætlan
Uttandura vallir og umsitingin hava saman við LBF P/F hava mett um tíðarætlan fyri at fáa lagt graslíki á í summar. Frá tí at samtykt fyriliggur vil samlaða tilgongd frá útboð til lisitatión verða umleið 4 vikur og síðani nevndarviðgerð og í býráðið umleið 3-4 vikur. Um málið verður samtykt í apríl kann vøllurin verða liðugur at taka í brúk í heyst. Sí hjálagt útbjóðingartilfar.

Mett verður at kostnaðurin fyri arbeiðið er umleið 3,6 mio.kr. alt eftir marknaðarstøðuni og kapping innan graslíkisveiting og innan tilfar og gerð av arbeiðinum. Hartil er sannlíkt at onnur liðugtger av økinum kring vøllin kann koma at kosta 2-3 mio.kr (við fyrivarni fyri nærri metingum tá verandi verkætlan er liðug í næstum – nýtt tilmæli kemur um tað tá).

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin av stjórnarskrivstovuni mæla nevndini til at samtykkja at heimilað umsitingini at fara undir útbjóðing av arbeiðinum við at leggja á graslíki vm. á Hoyvíksvøll og venda aftur til nevndina við einum úrsliti til støðutakan. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Ein meiriluti Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr tekur undir við tilmælinum.

Minnilutin Jógvan Arge tekur støðu, tá greitt yvirlit er útvegað yvir kostnaðin av tí, sum higartil er gjørt við vøllin, og yvir mettan kostnað at gera vøllin lidnan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Samlaði fíggjarkarmurin, ið játtaður er til arbeiðið at gera fótbóltsvøllin, er kr. 17,625 mió. Disponeraðar kostnaðarupphæddir eru kr. 17,227 mió. Avlopið er kr. 397.534.

Írestandi løgukarmurin til vøllin í Hoyvík fyri 2016 er kr. 2.000.000. Harumframt er samtykt við 1. viðgerð í býráðnum kr. 1.000.000 aftrat. Verður hetta samtykt við 2. viðgerð, er tøka játtanin sostatt kr. 3.397.534.

Kostnaðarmeting fyri verkætlanina við at leggja graslíkið er kr. 4.070.820 v/mvg.
Fíggjartørvur er sostatt kr. 673.286.

Tað eru eisini onnur arbeiði kring vøllin, sum ikki eru tikin við omanfyri – talan er um el-arbeiði, trappur, innkoyring og áskoðaraskýli, samlað kostnaðarmeting fyri hesi arbeiði er kr. 2.359.539 v/mvg.

Mett verður, at konta 5710 uttandura vallir kann fíggja írestandi partin til graslíkið og til okkurt av mest neyðugu arbeiðunum, sum eftir eru at gera kring vøllin, í alt kr.1.600.000, ið verður at játta til løgukontuna 5775 L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 3.000.000 av íløgukarminum 5775 ítróttaranlegg og kr. 1.600.000 av kontu 5710 uttandura vallir til løgukontu L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á umsitingina um at leggja við eina greiða uppseting av kostnaðinum av vøllinum í Hoyvík til viðgerðina í fíggjarnevndini og býráðnum.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at kr. 2.000.000,00 verða játtaðar av íløgukarminum 5775 Ítróttaranlegg og kr. 1.600.000,00 av konto 5710 uttandura vallir til løgukonto L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevst tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigðursson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Marin Katrina Frýdal greiddi ikki atkvøðu.

# 169/16 Broyting í reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 235/16 | 16/02185-1 |
| 2 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 169/16 | 16/02185-1 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur umrøtt møguligar broytingar í reglunum um útlutan av fastari ogn við atliti til at lata upp fyri tilflyting til Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi er gjørt uppskot, ið javnsetir lesandi, sum nærkast loknum lesnaði við borgarar í TK. Harumframt hevur umsitingin viðgjørt broyting, ið loyvir íbúgvum uttanfyri Tórshavnar kommuna at taka lut í útlutan av fastari ogn.

Viðvíkjandi teimum lesandi hevur umsitingin gjørt hetta uppskot til nýtt punkt 8:

**“Umsøkjarar undir útbúgving, ið eru búsitandi uttanfyri Tórshavnar kommunu og sum lúka treytirnar í pkt. 7 b) – e), kunnu melda til og taka lut í útlutan, um tey hava ætlan um at flyta í Tórshavnar kommunu eftir lokna útbúgving og kunnu skjalprógva, at tey eru liðug við útbúgving sína innan eitt ár.”**

**Viðvíkjandi íbúgvum, sum búgva uttanfyri Tórshavnar kommunu, hevur umsitingin gjørt hetta uppskot til broyting:**

**Við hvørja útlutan verða 80 % av teimum útlutaðu grundøkjunum útlutað millum umsøkjarar, ið lúka ásetingarnar í pkt. 7 og 8, og 20% verða boðin út í lutakasti, har øll kunnu luttaka, sum lúka treytirnar í pkt. 7 b - e).**

**Tilmæli:**
Mælt verður fíggjarnevndini til at umrøða omanfyrinevndu møguleikar.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Jógvan Arge, tekur undir við at broyta reglugerðina og seta inn nýtt pkt. 8 samsvarandi málslýsingini omanfyri viðvíkjandi teimum lesandi. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekstein, tekur undir við báðum uppskotum omanfyri, og beinir málið í býráðið við hesum tilmæli.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

# 170/16 Bygging av dagstovni í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.03.2015 | 39/15 | 14/03251-17 |
| 2 Mentamálanevndin | 18.03.2015 | 60/15 | 14/03251-17 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.03.2015 | 76/15 | 14/03251-17 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 27.05.2015 | 3/15 | 14/03251-17 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2015 | 12/15 | 14/03251-17 |
| 6 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 191/16 | 14/03251-17 |
| 7 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 238/16 | 14/03251-17 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 170/16 | 14/03251-17 |

## Málslýsing:
Víst verður eisini til mál 14/01859. Nú byggisamtyktin fyri ætlaða økið við Botnánna til nýggja dagstovnin er góðkend av landsstýrinum, er klárt at fara í gongd við at fyrireika byggiverkætlanina. Fyrsta stig er at fáa til vega kravspesifikatión og byggiskrá fyri nýggja stovninum.

Á íløguætlanini fyri 2014 eru kr. 14 mió settar av til nýggjan dagstovn í Kollafirði. Áður eru játtaðar kr. 1,5 mió til keyp av grundøkið og fyrireikingar v.m. Mett verður, at fíggjartøvur til fyrireikingar, kravspesifikatión, byggiskrá og útbjóðingartilfar er kr. 1 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 1 mió av íløgukontu 3175 Dagstovnur í Kollafirði til nevndu fyrireikingar.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2014**: Samtykt at játta 1 mió av konto 3175 til fyrireiking av dagstovni í Kollafirði, at bjóða dagstovnin út í umvendari licitatión og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 07. oktober 2014:** Borgarstjórin kunnaði um, at um 10 dagar verður klárt at senda út kravspecificatión til tveir arbeiðstakarar sum síðani skulu geva tilboð upp á arbeiðið.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað var um málið.

**Kollafjarðarnevndin 10. november 2014:** Borgarstjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Tilboð eru komin inn og meting gjørd, sum verður løgd fram fyri nevndini á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at geva umsitingini heimild til at samráðast við lægsta tilboðsgevara um sáttmála.

Eftir ætlan skal dagstovnurin avhendast á ólavssøku í 2016 frá arbeiðstakaranum, síðani skal umsitingin og leiðslan á stovninum arbeiða við at keypa innbúgv o.a áðrenn flutt verður inn.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Útbjóðingartilfar til veitan og uppsetan av innbúgvi til nýggja dagstovnin í Kollafirði er fyrireikað saman leiðsluni á stovninum og boðið út 18. mai 2016. 6 fyritøkur vórðu bjóðaðar. 3 fyritøkur valdu at geva tilboð.

Listi yvir innbúgv snúi seg um tað mesta, sum skal til fyri at ein nýggjur stovnur skal kunna takast í nýtslu, herundir borð og stólar til børn og starvsfólk, sofur, hillar, reolir, goymsluskáp, pussliborð, innandura leikur og súkklur til uttandurabrúk. Undantøk vórðu køkar og klæðiskáp til børn, sum var við í tilboðnum hjá heildararbeiðstakara, Sp/f Bulur. Nakað av innbúgvi frá verandi stovnum verður endurnýtt á nýggja stovninum.

Trý tilboð komu inn til freistina 08. juni 2016, harav eini tilboðsgevarin eisini gav eitt alternativt tilboð.

Tilboðini vóru sum fylgjandi:

| | |
|---|---|
| EIKIN | kr. 627.978,00 |
| NEMA | kr. 454.520,00 |
| BLIKA | kr. 439.458,00 |
| BLIKA, alternativt tilboð | kr. 418.822,00 |

Umsitingin hevur gjøgnumgingið tilboðini. Bílígasti tilboðsveitarin hevur einki frávik frá snið og dygd, sum verður fyriskrivað í útbjóðingini, men í alternativa tilboðnum eru slík frávik. Tí verður mælt til ikki at taka av alternativa tilboðnum.

Tilboðið er eisini innanfyri kostnaðarmetingina. Fígging er tøk í samlaðu projektjáttanini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at at taka av tilboðnum frá Sp/f Blika áljóðandi kr. 439.458,00.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

Sjúrður Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 171/16 Søla bygningur matr. nr. 320a. ( Hugskotið )

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 29/16 | 15/05000-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 177/16 | 15/05000-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 137/16 | 15/05000-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 202/16 | 15/05000-1 |
| 5 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 171/16 | 15/05000-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 239/16 | 15/05000-1 |

**Málslýsing:**

Bygningurin hevur staðið á sølulista hjá Skyn í nakrar mánaðar. Prísuppskot 3,9 mill. kr.

Í sølulýsingini verður tilskilað, at krav er um útvent virksemi í niðastu hædd.

Sambært Skyn framgongur, at nakrir fyrispurningar hava verið uppá ognina og hava verið 4 framsýningar.

Viðkomandi áhugaðu keyparar hava ymiskar ætlanir við húsunum, sum spenna frá at keypa ognina at leiga út til vinnuligt virksemi. At keypa til bústað og leiga veghædd út til útvent virksemi. Onkur hevur eisini nevnt møguleikan at býta bygningin upp í íbúðir til útleigan.

Enn er onki boð komið uppá ognina.

**Tilmæli:**

Bygningurin hevur ikki staðið so leingi til sølu, og mæla kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini til at hava ognina á sølulista eina tíð enn.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti.**
Tað eru ymiskt sum talar fyri, at prísuppskotið 3,9 mill. kr. er sett ov høgt í mun til marknaðarvirðið.

Skyn ásetti prísuppskotið út frá eini meting av hvat ognin kann geva í leiguinntøkum, út frá tí fortreyt, at øll ognin verður leigað út sum vinnuligt leigumál, við einari samlaðari leiguinntøku

á uml. 372..000 kr. pr. ár. . ( 1.771 kr/m2. pr ár ) Hetta kann samanberast við kommununar leigu fyri handilshølir í miðbýnum sum er 1.000 kr.m2. pr. ár.

Løgdeildin hevur í samráð við Skyn fyri umleið einum mðr. síðani lækkað prísuppskotið til 3 mill. kr. men tilskilar kommunan sær framvegis rætt til ikki at taka av boðum.

Eitt boð er innkomið á 3. mill. kr. sum er galdandi til 03.05.2016 kl. 12:00

Bjóðarin hevur boðað frá, at hansara boð ikki stendur við longur enn til omanfyri nevndu freist.

Men hann er møguliga sinnaður til at leggja boð innaftur áljóðandi 3 mill. kr. um hann fær at vita, at kommunan er sinnað at selja fyri 3. mill. kr.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini, mæla til at geva heimild til at selja ognina fyri í minsta lagi 3. mill. kr.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykkt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykkt.

**Ískoyti.**

Nýtt boð er innkomið áljóðandi 3. mill. kr. Boðið er galdandi til fríggjadagin 03.06.2016 kl. 14:00

Meklarin hevur í samráð við kommununa tikið ognina av sølulista, til býráðið hevur tikið avgerð.

Viðkomandi, sum hevur bjóðað, er kunnaður av meklara um oljulekan.
Søluskeytið verður áteknað um at keyparin er kunnaður um oljulekan.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja ognina fyri innkomið boð áljóðandi kr. 3. mill. kr

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Útsett.

**Ískoyti.**
Viðkomandi sum bjóðar, ynskir framvegis at keypa ognina, hóast oljuskaðan.

Keyparin tekur tó tað fyrivarnið, at møguligur skaði av oljulekanum verður afturgjørdur, áðrenn hann keypir.

Tryggingin, har bygningurin er tryggjaður, vísir á, at endurgjaldsábyrgdin enn ikki er staðfest. Tryggingin vísir til, at kommunan hevur eina sjálvábyrgd á kr. 250.000,00 sum merkir, at tað einans eru skaðar omanfyri hesa upphædd, sum kommunan kann krevja endurgjald fyri.

Vanlig mannagongd er, at málið fyrst verður viðgjørt á bygningstryggingini hjá eigaranum, og verður tí mælt til, at gera skaðan aftur.

Tá møguligur skaði er afturgjørdur, verður sett endurgjaldskrav fram ímóti tryggingini hjá EFFO.

Um tilber, verður eisini reist endurgjaldskrav uppá møguliga sjálvábyrgd.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at umvæla bygningin, og síðani at selja bygningin fyri innkomið boð 3.000.000 kr.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Tikið av skrá.

# 172/16 Møgulig søla av Dagstovninum millum Bóla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 200/16 | 16/02101-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 181/16 | 16/02101-1 |
| 3 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 172/16 | 16/02101-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | | | 16/02101-1 |

**Málslýsing:**
Nýggi dagstovnurin í Kollafirði er eftir ætlan klárur at taka í nýtslu eftir summar, og tí er ikki brúk fyri Dagstovninum millum Bóla, matr.nr. 329, Kollafjørður.
Grundstykkið er uml. 1600 m².
Stovnurin er í 2 hæddum á 170 m2 = 240 m2.
Húsið er bygt í 1970.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at selja matr.nr. 329, Kollafjørður.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at mæla til at søluupphæddin verður inntøkuførd á grein 3.

**Ískoyti:**
Víst verður til kommunustýrislógina **§ 49.** Ikki er loyvt kommunum at fíggja rakstur, rentur og avdráttir við lántøku ella við inntøku frá sølu av fastari ogn.

Vanliga mannagongdin er, at keyp verða inntøkuførd á konto 6175. Mælt verður til at inntøkuføra søluupphæddina á konto 6175. Flyting millum íløgur og rakstur skal fyri sum ein eykajáttan.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at fylgja vanligu mannagongd og at keypið verður inntøkuført á konto 6175.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 173/16 Tórsvøllur - vestursíðan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 59/16 | 16/00962-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 185/16 | 16/00962-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 244/16 | 16/00962-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 173/16 | 16/00962-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 16.06.2016 | 193/16 | 16/00962-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Tórsvøllur vestursíða**
Tá Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya í 2010 settu sær fyri at fáa Tórsvøll til góðkent altjóða stadion, var fyrsta stig at fáa til vega eina heildarætlan, tann sonevndi masterplanurin, sum bæði viðgjørdi skipan av øllum ítróttaøkinum í Gundadali og tørvin á kravdum fasilitetum til sjálvan Tórsvøll sum landsliðsstadion til altjóða kappingar hjá UEFA og FIFA.

Viðurskifti, sum vóru sett á skrá til tess, vóru m.a.:
- At vaksa um sjálvan leikvøllin samsvarandi altjóða krøvum
- At skifta grasvøllin út við altjóða góðkent graslíkið
- At seta upp nýtt ljósannlegg samsvarandi krøvum til sjónvarping av altjóða dystum
- At yvirdekka áskoðaraplássini til tess at reisa verju fyri vindi og regni, og í hesum sambandi at betra um komfort til áskoðararnar
- At avmarka talið av áskoðarum úr 6.440 niður á uml. 5.000
- At reisa nýggjan bygning á suðursíðuni, ið kann brúkast til nógv ymisk endamál bæði ítróttarliga, vinnuliga og umsitingarliga
- At skipa stadion við nýggjum inn- og útgongdum, ið lúka altjóða krøv

Útyggingarstigini hava í høvuðsheitum verið hesi:
- Nýtt ljósannlegg 2011
- Grasvøllur skiftur til graslíki 2012
- Suðurtribunan tikin niður og nýggjur bygningur bygdur 2013 – er m.a. høvuðsinngongd til Tórsvøll, umsitingarhøli hjá FSF, og 900 áskoðarapláss undir taki og nýggjum setrum
- Eystara skýlið bygt 2014-2015 – tak yvir áskoðarapláss, nýggj setur, vesi og búðir. Eystara skýlið er bundið saman við bygninginum og áskoðaraplássini á suðurendanum.

**Vestara skýlið**

Vestara skýlið er framhald av heildarætlanini, har áskoðaraplássini verða dagførd og koma undir tak. Vesturskýlið verður eins og eysturskýlið bygt saman við bygninginum á suðurendanum og skapar sostatt samanhangandi form sum hestaskógvur. Tá vesturskýlið er bygt, er tað samært heildarætlanini bert torgið frammanfyri Tórsvølli, sum er eftir.

Verkætlanin við vesturskýlinum fevnir eisini um útbygging av gamla FSF-húsinum bæði norður- og suðureftir sum liður í, at Tórsvøllur skal røkka ásetingini um “Category 4” leikvøllir, ið er ásetingin fyri leikvøllir til altjóða landsdystir. Í løtuni er Tórsvøllur ein “Category 3” leikvøllur. Til tess at røkka hesum, skulu umklæðingin til spælarar og dómarar betrast, eins og umstøður til dopingkanningar og læknarúm. Umstøður til tíðindafólkini og VIP eru heldur ikki nøktandi.

Hesir nýggju fermetrarnir hava tann vinning umframt, at umklæðingarrúm, vesir og tey almennu økini kunnu eisini brúkast til tiltøk, sum eru í Gundadali, serliga á Niðara vølli, sum harvið fær høliskarmar til taks, ið ikki eru dag.

Á ovastu hædd eru góðir møguleikar fyri fleirnýtsluhølum, eitt nú gisting í sambandi við landsliðsvenjingar ella skúla, skrivstovur og kravdar VIP-fasilitetir í sambandi við landsdystir. Til ber at byggja 200 nýggj áskoðarapláss her, so at samlaði áskoðarakapasiteturin á vestursíðuni verður uml. 1.730.

Í stuttum fevnir útbyggingin um hesi høli:

- Veghædd – høli til vaktarhaldið, 2 umklæðingarrúm til dómarar, dopingrúm, 2 nútíðar umklæðingarrúm til liðini, høli til tíðindafundir, mixed zone (fjølmiðlar/leikarar), sum harumframt er foreldralounge móti niðaravølli
- 1. hædd – vesi, arbeiðsrúm hjá tíðindafólkuj
- 2. hædd – VIP høli, sølubúðir
- 3. hædd – sonevndar skybox til fleirnýtsluendamál, vaktarrúm

Útbyggingin loysir eisini trupulleikan við inngongdum, har áskoðarar í dag mugu inn á vøllin fyri at koma til áskoðaraplássini. Sum heild fer útbyggingin at lætta munandi um fyriskipan av dystum, kappingum og tiltøkum á Tórsvølli. Tey síðstu áskoðaraplássini, gestir og tíðindafólk koma eisini undir tak. Og ikki minst, at Tórsvøllur verður endaliga liðugur og kann verða ein stoltleiki fyri bæði høvuðsstaðin og landið.

Verkætlanaruppskotið er í mai 2016 lagt fyri UEFA at góðkenna.

Ynskið hjá FSF hevur verið, at útbyggingin skuldi verða liðug í september 2018, tá nýggja kappingin Nations League, sum UEFA skipar fyri, fer av bakkastokki. Hesa tíðarætlan ber ikki til at røkka, nú so langt er útliðið, men mett verður, at til ber at skipa bygingina soleiðis, at dystir kunnu fyrskipast kortini.

Hendan kappingin verður samstundis sum vanligu EM og HM-undankappingarnar. Hetta kemur eisini at økja um virksemið á Tórsvølli, har tað í miðal fara at vera 5 A-landsliðskappingardystir um árið. Spælt verður tá alt árið, tvs. eisini um veturin, har tað eisini er møguligt við øðrum smærri millumlandakappingum.

Útbyggingin gevur eisini nýggjar og betri møguleikar fyri øðrum virksemi á Tórsvølli, serstakliga størri tiltøk og stadionkonsertir.

**Samstarv**
Eins og øll tey undanfarnu útbyggingarstigini síðan 2010, er ætlanin at skipa arbeiðið við vesturskýlinum í samstarvi við FSF eisini fíggjarliga.

Gjørt er uppskot til samstarvsavtalu við støði í avtalunum fyri hini útbyggingarstigini.

Sambært uppskotinum til avtalu verður lagt upp, at byggingi verður skipað í partalagi. Fyribilskostnaðarmeting fyri alt útbyggingarstigið er kr. 98 mió. Lagt er upp til, at hvør parturin rindar helvtina av kostnaðinum, tvs. 50/50, og at gjøldini hjá hvørjum parti fella soleiðis:

2016: FSF kr. 5 mió, TK kr. 5 mió.
2017: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2018: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2019: FSF kr. 5 mió, TK kr. 8,75 mió
2020: TK rindar FSF kr. 8,75 mió
2021: TK rindar FSF kr. 9 mió

FSF hevur góðkent henda leist. Til ber ikki at staðfesta endaliga byggiskostnaðin fyrr enn eftir útboð.

Tíðarætlan yvirskipað:
- Juli-desember 2016 – projektering
- Januar 2017 – útboð
- Februar 2017 – uppstartur og partalag
- Februar-desember 2017 – stig 1: fundamentir, stuðlamúrar, lendisarbeiði, betong, vegur og stál
- Januar-august 2018 – stig 2: Stál, stálsperrur og polycarbonate
- August 2018-august 2019 – stig 3: Komplettering, innleggingar og stólar.

Í avtaluuppskotinum verður, sum omanfyri nevnt, lagt upp til bygging av vestursíðuni í partalagssamstarvi. Harumframt, at skipanin við stýrisbólki millum TK og FSF um Tórsvallar-bygginina verður at halda fram, á sama hátt høvuðsráðgevin.

Til tess at fáa fyrireikað, prosjekterað og bjóða arbeiðið út verður mett neyðugt við játtan frá kommununi uppá kr. 5 mió í 2016 og samsvarandi kr. 5 mió frá FSF.

Sambært dagførdu íløguætlanini fyri 2016 eru settar kr. 5 mió av til Tórsvøll.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja uppskot til samstarvsavtalu við FSF um at gera yvirdekking yvir tribunir á vestarasíðu á Tórsvølli og út- og umbygging av verandi bygningi har. Mælt verður eisini til at játta kr. 5 mió av íløguætlanini 2027 5775 Ítróttaranlegg til fyrireiking, projekting og útboð.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Halla Samulensen, samtykti at taka undir við fyriliggjandi avtalu millum TK og FSF, við teirri treyt, at tær upphæddirnar sum eru nevndar í avtaluni eru

endaligar fyri TK, eisini um verkætlanin verður dýrari, men at útreiðslubýtið verður 50/50 um verkætlanin verður bíligari enn mett.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við avtaluni vegna ov stóran iva um veruliga byggikostnaðin fyri hetta byggistigið.

**Ískoyti:**

Sambært fyriliggjandi uppskoti til avtalu millum TK og FSF fella gjøldini hjá hvørjum parti soleiðis í sambandi við verkætlanina:

2016: FSF 5 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2017: FSF 26,25 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2018: FSF 26,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2019: FSF 7,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2020: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2021: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2022: TK rindar FSF 7,0 mió kr.
2023: TK rindar FSF 7,0 mió kr.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við mentamálanevndini treytað av, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum TK og FSF á vestursíðuni verður tikið upp til nærri støðutakan. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, vísir til sína støðutakan í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri, og tveimum ímóti at taka undir við tilmælilnum frá meirilutanum í fíggjarnevndini. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Jógvan Arge greiddi ikki atkvøðu.

# 174/16 Vegna Búrøkt Kristjan á Neystabø : Viðvíkjandi útstykking matr. nr. 1401a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 177/16 | 15/03170-8 |
| 2 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 174/16 | 15/03170-8 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við útstykkingarætlan á matriklinum 1401a er ynski um at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at A1 økið markar við serstaka byggisamtyktarøkið í Hoydølum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at økið verður broytt frá D1 til A1 sambært kortskjølum.(Skjal nr.1 Verandi byggisamtykt 15/03170-9 og Skjal nr.2 Broytingaruppskot 15/03170-10).

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.
Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

## 175/16 Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 73/14 | 14/05161-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.02.2015 | 41/15 | 14/05161-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.03.2015 | 57/15 | 14/05161-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2015 | 97/15 | 14/05161-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 92/15 | 14/05161-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 190/15 | 14/05161-3 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 133/15 | 14/05161-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 279/15 | 14/05161-3 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.02.2016 | 55/16 | 14/05161-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 63/16 | 14/05161-3 |
| 11 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 61/16 | 14/05161-3 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.03.2016 | 79/16 | 14/05161-3 |
| 13 Fíggjarnevndin | 17.03.2016 | 119/16 | 14/05161-3 |
| 14 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 91/16 | 14/05161-3 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 166/16 | 14/05161-3 |
| 16 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 217/16 | 14/05161-3 |
| 17 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 175/16 | 14/05161-3 |

**Málslýsing**:
Tórshavnar kommuna hevur keypt ognina undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir, frá Valbjørn Dalsgarð.

Sambært uppruna ætlanini fyri Kongavarða skuldi ovasti parturin av økinum nýtast til raðhúsabygging, men kommunan hevur ætlanir at útstykkja økið til sethúsagrundstykkir.

Neyðugt er at gera skipanarætlan fyri alt økið.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin heimilar umsitingini:
- at umsitingin, saman við ráðgeva, ger eitt skipanaruppskot fyri alt økið, sum umfatar byggiøki, felags- og fríøkir, atkomuviðurskifti, vegir og gøtur v.m. og at gera eina fyribils kostnaðarmeting.
- at arbeiði, sum er mett at kosta kr. 100.000, í fyrsta umfari verður fíggjað av serkønari hjálp á teknisku fyrisitingini 1313.
- At skipanaruppskotið verður at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt skipanaruppskot fyri fyri ognina undir Kongavarða. Eftir uppskotinum er pláss til 30 raðhús, 4 íbúðarhús og 50 grundstykkir til sethús.Fyri at náa einum talið uppá 50 grundøkir til sethús, er tó neyðugt at gera eitt makaskifti uppá uml. 1500 $m^2$ við Búnaðarstovuna, soleiðis at teir fáa uml. 1500 $m^2$ burtur av matr. nr. 255a fyri uml. 1500 $m^2$ av matr. nr. 4a Kirkjubøhagi Fyri Handan, Poul Müller festari.

Atkomuvegurin niðan til tey 50 sethúsagrundstykkini er uml. 375 m, max hall er 120 promillu. Hesin vegurin er mettur at kosta uml. 6,5 milliónir. Hesin vegurin kann verða atkoma til fleiri grundstykkir, um kommunan fær ognað sær meira lendi burtur av matr. nr. 4a.

Grundstykkini eru uml. 400 $m^2$ til støddar.

Tað ber ikki til at gera eina kostnaðarmeting út frá verandi tilfari.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við skipanaruppskotinum, at abeiða víðari við at gera eina kostnaðarmeting og løgdeildin tekur samráðingar upp við Búnaðarstovuna um makaskiftið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við skipanaruppskotinum og gjørt tilhoyrandi kostnaðarmeting. Fyri at minka um hallið á býlingsvegnum, eru smávegis broytingar gjørdar í ætlanini. Fyri at fáa so gott útsýni sum møguligt frá hvørjum grundstykki sær, verður arbeitt við fastløgdum planeringskotum . Sí skjal nr. 4 og 5.

1. Býlingsvegur til 4 íbúðarblokkar og p-pláss til 24 íbúðir. Býlingsvegurin er 200 m langur og pláss er fyri 2 bilum til hvørja íbúð.
2. Býlingsvegur til útstykking við 50 grundstykkjum. Býlingsvegurin er umleið 345 m langur, og gongubreyt er uttarumegin vegin. Partar av vegnum krevja nógv fyrireikandi lendisarbeiði. Hægsta veghall er umleið 120 promilli.
3. Sethúsavegur við 50 grundstykkjum. Vegurin er 490 m langur, 9 m breiður, og 1,5 m breið gongubreyt er báðumegin. Hægsta veghall er umleið 100 promilli.

Viðheft er kostnaðarmeting við mettum kostnaði á
Skjal nr. 1. Býlingsvegi til íbúðarblokkarnar
Skjal nr. 2. Útstykking undir Kongavarða
Skjal nr. 3. Býlingsvegi til útstykkingina undir Kongavarða
Viðheft er eisini
Skjal nr. 4. Útstykking og atkomuvegur.
Skjal nr. 5. Útsýni

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at seta í gongd projektering av projektuppskoti við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri nummar 2. Býlingsveg til útstykking, og nummar 3. Sethúsaveg við 50 grundstykkjum, at uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørt, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
LBF hevur gjørt útbjóðingartilfar til útstykkingina við 48 grundstykkjum. Afturat uppruna uppskotinum er gjørt 2 felags parkeringspláss í útstykkingini og gongubreyt og súkklubreyt báðu megin atkomuvegin. Projektið er granskað og góðkent við smávegis broytingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða útstykkingina út í almennari lisitatión og at innkomnu boðini verða løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina skjótast gjørligt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Ískoyti:**
Tekniska nevndin skal taka støðu til vegaføringina og teknisku veitingarnar í sambandi við útstykkingarætlanina.

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum og tekniska stjóranum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 2. oktober 2015. Nevndin hevur tó hesar viðmerkingar:
- Býlingsvegur til íbúðarblokkarnar (skjal 1) skal hava gongubreyt á báðum síðum.
- Útstykking undir Kongavarða (skjal 2) – vegurin skal hava gongu- og súkklubreyt á báðum síðum.
- Býlingsvegur til útstykkingina undir Kongavarða (skjal 3) – skal hava gongubreyt á báðum síðum.

Nevndin tekur ikki støðu til útbjóðingarhátt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal taka støðu til samtyktina hjá Byggi- og býarskiparnevndini 02. oktober 2015 og samtyktina hjá Teknisku nevnd 04. november 2015.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, samsvarandi samtykt byggi- og býarskipanarnevndarinnar tann 2. oktober 2015 og eftirfylgjandi býráðsnevndarsamtyktum, boðið arbeiðið at gera atkomuvegin og útstykkingina út í innbodnari lisitatión.

Inn komu fylgjandi tilboð og tilboðsupphæddir:

| | |
|---|---|
| Sp/f TG Verk: | kr. 25.966.157,-. |
| P/f Articon: | kr. 16.644.779,-. |
| P/f J. & K. Petersen: | kr. 19.619.450,-. |

Ráðgevi kommununnar hevur eftirkannað tilboðini og mælir til at taka av tilboðnum frá P/f Articon.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum frá P/f Articon og heimila umsitingini at samráðast við P/f Articon um sáttmála um arbeiðið, at leggja fyri nevndina aftur saman við samlaðari kostnaðarmeting av arbeiðinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í uppskoti til sáttmála við P/F Articon (sí j. nr. 14/05161-73), har prosjektering, forkanningar, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í nevnda sáttmálauppskoti við P/f Articon metir umsitingin, at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 26.284.793,- tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 14/05161-72) har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2016.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararktekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at góðkenna uppskotið til sáttmála og játta kr. 26.284.793,- til gerð av útstykkingini.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini 13 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017.
Eisini verur mælt til at heimila umsitingini at útvega prosjekt og tilboð uppá at planera grundøkini.
Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. mars 2016:** Samtykt at góðkenna uppskotið til sáttmála og at játta kr. 21.554.795,- til gerð av útstykkingini. Eisini verður mælt til at heimila umsitingini at útvega projekt og tilboð uppá at planera grundstykkini.
Málið verður beint í figgjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 21.554.795 av konto 6475, ið verður fíggjað við gjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
P/F Articon hevur eftir áheitan latið kommununi tilboð uppá at planera grundøkini, sum koma at liggja fram við útstykkingarvegnum, við skitsum frá býarskipanardeild kommununnar sum fyrimynd.
Tilboðið frá P/F Articon i hevur støði í tekningum, nøgdarútrokningum, metingum v.m. sum P/F Articon sjálvi hava útvegað. Umsitingin hevur ikki havt umstøður at eftirkanna nøgdir o.a. og má tí endaligi kostnaðurin takast við fyrivarni um, at nøgdirnar sum P/F Articon hevur roknað seg fram til, eru røttu og endaligu nøgdirnar sum eru, tá arbeiðið er liðugt.

Tilboðið frá P/F Articon (sí j. nr. 14/05161-89) fyri at planera tey 48 grundøkini er uppá kr. 4.952.255,- uttan MVG.

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í tilboðnum frá P/F Articon, har trygging, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í nevnda tilboði frá P/f Articon metir umsitingin, at arbeiðið at planera grundøkini kann gerast fyri kr. 6.473.816,-, tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 14/05161-88), har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2016.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararktekturin mæla til at heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F Articon um planering av gundøkjunum, við støði í tilboði teirra og innanfyri samlaða fíggjarkarm á kr. 6.473.816,- og at játtaðar verða nevndu kr. 6.473.816,- til arbeiðið.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini 3,2 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017.
Eisini verur mælt til at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 176/16 Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri kommunuskúlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 128/16 | 16/01722-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.05.2016 | 144/16 | 16/01722-1 |
| 3 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 176/16 | 16/01722-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við ætlanirnar um bygging av lestraríbúðum og innrætting av fimleikarhøll til innandura spæliplláss, aulu til mentanarligt virksemi, listaverkstað, smærri vinnuligt virksemi og kommunuskúlagarðinum til felags útirúm, er uppskot gjørt til serstaka byggisamtykt til skipan av bygginigini og brúki av økinum.

Av tí at byggingin kemur at hava ymiskar eigarar og ymiskt virksemi verður í økinum, er neyðugt at hava greiðar avtalur fyri krøv og skyldur millum aktørarnar á økinum. Hesar avtalur kunnu ikki bert gerast við hesi serstøku byggisamtyktini men mugu gerast við sáttmálum millum partarnar. Byggisamtyktin er bert ein yvirordnað skipan av økinum og virkseminum her.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstaka byggisamtyktin fyri økið við kommunuskúlan verður góðkend og beind í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 177/16 Umsókn um loyvi til víðarisølu av matr. nr. 35an, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 204/16 | 16/01923-2 |
| 2 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 177/16 | 16/01923-2 |

**Málslýsing:**

Viðvíkjandi óbygdum grundstykki. Matr. nr. 135an, Hoyvík. Jóansgøta 22, Hoyvík. Vídd 499m2. Grundstykkið er óútgrivið.

Seint í 2013 lýsti kommunan grundstykkið til sølu hjá ognarmeklara, og varð stykkið selt keyparunum í januar 2014 fyri kr. 775.000,-

Viðmerkjast skal at skeytið vísir til verandi servituttir, sum áseta 2 ára byggiskyldu, og at ikki er loyvt at selja óbygda stykkið víðari uttan loyvi frá kommununi.

Kommunan selur sum meginregla grundstykkir við ávísum treytum vegna ymisk áhugamál hjá kommununi.

Ein av hesum er, at víðarisøla ikki er loyvd. Hetta fyri at forða fyri spekulatión í kommunalum stykkjum. Hetta er ein sera grundleggjandi treyt, ið eisini er vanlig í t.d. donskum kommunum.

Viðvíkjandi spekulatión, so hava verandi eigarar keypt stykkið í fríari sølu fyri stuttari tíð síðan, har kappbjóðað var og stykki var selt fyri 775.000,00

Verandi eigari hevur  eisini haft aðrar kostnaðir í.s.v. keypið og koma at hava útreiðslur í.s.v. møguliga sølu.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at loyva víðarisølu vísandi til, at stykkið fyri stutt síðan er selt fyri marknaðarprís.

Heimildin er treytað at sølan verður avgreidd innan rímiliga tíð, og annars við somu treytum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

## 178/16 Umsókn um byggiloyvi til uppafturbygging til frítíðarhús á matr. nr. 76 við Hoydalsá (Sundsvegin).

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 9/16 | 15/04607-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 62/16 | 15/04607-2 |
| 3 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 65/16 | 15/04607-2 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 178/16 | 15/04607-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tann 25. nov. 2015 fær kommunan eina umsókn við tekningum frá Páll Olsen vegna Arnfinnur Jacobsen um byggiloyvi til uppafturbygging av frítíðarhúsi við Hoydalsá (Sundsvegin)

Sjálv umsóknin er undirskrivað av Ragnhild Jacobsen, dagfest 28.okt. 2015, og í viðlagda leigusáttmálanum er Sjúrður Jacobsen leigari av grundøkinum sambært dómi 1. aug. 1973.

Húsini brunnu í grund 16. jan. 2015. Tó stendur ein amboðsskúrur skamt frá tí niðurbrenda, sum er uml. 9 m² til víddar og tykist í rættiliga góðum standi.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið er umfatað av serstøku byggisamtyktini fram við Hoydalsá sum urtagarðsøki.
Har stendur m.a. í 4. grein: *Øki til urtagarðar (kolonihavar) verður lagt av oman fyri Svartafoss.* Og víðari í 8. grein: *Á økinum kunnu verða bygdir amboðsskúrar til urtagarðsrøkt, í mesta lagi 10 m² til víddar og eftir nærri góðkendum reglum.*Og í 9. gr.
BYGGING, IÐ ER TIL: *Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.*

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Við umsóknini er eisini avrit av leigusáttmálanum millum Sjúrð Jacobsen og Føroya Jarðarráð, undirskrivað 19. des. 1963, og har stendur m.a. í stk. 5: *Leigutakarin hevur loyvi til at byggja urtagarðshús á stykkinum, aðrar bygningar er ikki loyvt at seta á stykkið uttan við serstøkum loyvi.*
Sum viðmerking stendur aftast í leigusáttmálanum: *Eini summarhús standa á stykkinum, ið loyvi er givið til.*
Hóast væl er leita í goymsluni hjá kommununi, so er kortini einki loyvi at finna til hetta summarhúsið.
Húsið, ið brendi, var 41,3 m² til víddar, ætlanin er at vaksa um hetta við einum útbygningi (durur, bað og wc) umframt yvirdekkað øki soleiðis at húsið verður 54,1 m² til víddar. Herumframt verður søkt um eina nýggja træ terrassu, sum skal verða 27 m².
Her skal viðmerkjast, at ongin kloakkskipan er í nánd av hesum øki, og ongin ætlan fyriliggur um kloakkskipan á øki, ið er ætlað urtagørðum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Eitt líknandi mál sum hetta varð avgreitt í Kærunevndini í lendismálum tann 11.12.2008. (viðheft skjal) Uppafturbygging var ikki í samsvar við ásetingarnar fyri økið.
Sagt verður í samandráttinum:
*Kært varð um, at kommunan ikki vildi geva loyvi til at byggja niðurbrendan bygning upp aftur í sama líki, tí bygningurin ikki var í samsvar við núgaldandi byggisamtykt fyri økið.*

*Kærunevndin í lendismálum staðfesti avgerðina hjá kommununi við tí grundgeving, at byggingin skal vera í samsvari við galdandi byggisamtykt, vísandi til § 10 í býarskipanarlógini.*

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Ongin fíggjarlig binding fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Hevur verið hjá løgdeildini, sum vísir á omanfyri nevnda kærumál.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Hevur ikki verið hjá øðrum deildum.

**Skjøl:**
Umsókn, tekningar og leigusáttmáli, j. nr. 15/04607-1
2 myndir av verandi støðu á matrikklinum, j. nr. 15/04607-3
2 loftmyndir av økinum, j. nr. 15/04607-4
Avrit av avgerð hjá kærustovninum í líknandi máli, j. nr. 15/04607-5

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla frá at geva byggiloyvi til frítíðarhús, grundað á:

1. Økið er umfatað av serstøku byggisamtyktini fram við Hoydalsá sum urtagarðsøki.
2. Einans amboðsskúrar til urtagarðsrøkt, í mesta lagi 10 m², kunnu byggjast á økinum. (ein slíkur á 9 m² er á økinum)
3. Eingin kloakkskipan er.
4. Avgerð hjá Kærunevndini í líknandi máli.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Formaðurin hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Helena D. á Neystabø, samtykti at játta umsóknini.
Ein minniluti, Jákup Dam og Bjørghild Djurhuus, heldur seg til samtyktina 8. januar 2016.

**Ískoyti:**
Ánarin hevur rykt eftir byggiloyvinum, sum ikki kann útskrivast uttan at ein kloakkplanur fyriliggur, sum eisini skal góðkennast av teknisku deild. Sum lýst í frágreiðingini, so er talan um eitt øki, sum ikki er byggiøki. So her er eingin kloakkskipan í nánd. Og nú er so eisini ráðgevarafyritøkan SMJ komin við fyrispurningi til kommununa, hvussu hetta kann loysast.

Umsitingin kunnar um málið.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Kunnað varð um málið.
Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal og Sigrun Mohr krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

Sjúrður Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 179/16 Skyn : Umsókn um loyvi til víðarisølu av matr. nr. 676g Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 205/16 | 16/02060-2 |
| 2 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 179/16 | 16/02060-2 |

**Málslýsing:** Í sambandi við, at eigarin av matr. nr. 676g, Tórshavn, Sjúrður Gorm Petersen, hevur selt ognina, verður søkt um loyvi til, at Tórshavnar kommuna góðkennir víðarisøluna.

Talan er um óplanerað og óbygt grundøki.

Servituttur er tinglýstur á ognina um, at ognin kann ikki verða seld uttan loyvi frá Tórshavnar kommunu.

Talan er um ogn, sum Tórshavnar kommuna hevur selt eigaranum við fyribilsskeyti frá 1988 og endaligum skeyti frá 1990.

Ognin er makaskift við aðra ogn, sum er latin Tórshavnar kommunu av útstykkjaranum, og sambært avtalu við útstykkjaran, skuldi Tórshavnar kommuna í sambandi við makaskiftið lata Sjúrða Gorm Petersen og trimum øðrum hvør sítt grundstykki afturfyri makaskiftu ognina.

Hóast talan hevur verið um privata útstykking, hevur kommunan tinglýst byrðar um m.a. víðarisølu og byggifreist á ognina.

**Tilmæli:** Vìsandi til, at talan er um privata útstykking, og til, at kommunan hevur selt ognina í sambandi við makaskifti, mæla leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin til at loyva víðarisølu sambært áheitan frá eigararanum, sum hevur skeytað ognina víðari til annan keypara.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

Sjúrður Olsen, Anfinn Brekkstein og Jógvan Arge luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

# 180/16 Áheitan á kommununa um at strika servituttin á ognini matr. nr. 1041a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 143/16 | 16/01221-3 |
| 2 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 113/16 | 16/01221-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 206/16 | 16/01221-3 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 180/16 | 16/01221-3 |

**Málslýsing:** Anfinn V. Hansen hevur í skrivi heitt á kommununa um at strika servituttin um helvtargjald á ognini matr. nr. 1041a. Servitutturin varð lagdur á ognina í 1966, tá ið kommunan seldi trøðna til táverandi leigaran, sum upprunaliga hevði leigað trøðna frá Færø Amt, og sum sostatt var leigari, tá ið kommunan yvirtók Álagerðisfestið í 1932.

Hægstirættur segði 20. november 2015 dóm í máli, ið snýr seg um líknandi viðurskifti sum í fyriliggjandi máli. Hægstirættur staðfesti, at kommunan hevur ikki havt rætt til at leggja servitutt á traðirnar í sambandi við sølu til teir persónar, sum høvdu leigað traðirnar, áðrenn kommunan yvirtók Álagerðisfestið.

Av tí at talan er um meinlík mál, hevur kommunan – vísandi til Hægstarættardómin - ikki heimild at halda fast um, at servituttur skal vera á ognini 1041a, Tórshavn, og tí verður mælt til at strika servituttin samsvarandi áheitanini frá Anfinni V. Hansen.

**Tilmæli:** Leiðarin á Løgdeildini og kommunustjórin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at strika servituttin um helvtargjald á ognini matr. nr. 1041a, Tórshavn, í grein 2, síðsta pkt. í ognarbrævinum millum Tórshavnar kommunu og Oluf Hansen, dagfest 3. november 1966 og undirskrivað 4. november 1966.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmæilnum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

## 181/16 Umsókn vegna Dekksentrið um keyp av parti av matr. nr. 1381b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 169/16 | 16/01796-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.05.2016 | 162/16 | 16/01796-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 214/16 | 16/01796-3 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 181/16 | 16/01796-3 |

**Málslýsing:**
P/F Dekksentrið søkir um loyvi at keypa ein hóskandi part (í eystara endanum bejnt sunnanfyri Dekksentrið) av matr.nr. 1381B.
Ætlanin er at víðka um frammanundan tepru parkeringsmøguleikarnar.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildin mæla til at beina málið í Byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til viðgerðar hjá umsitingini, byggi- og umhvørvisdeildini og býarskipanardeildini og verður mælt til at leggja ein grønan geira út móti Tjaldursvegi og eitt øki til møguliga gongubreyt út móti Falkavegi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at økið sum ætlanin er at selja verður uml. 300 m², sum víst á kortskjali j.nr. 16/01796-7.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Ískoyti.

Økið sum talan er um, er til víddar 268m2.

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til selja umsøkjarum lendið fyri 600 kr.m2.,og skal keyparin harumframt rinda allar útreiðslur í samband við avgreiðslu av málinum.

Málið verður avgreitt við marknaðarumskipan.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

Anfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

## 182/16 Visit Tórshavn. Leigumál í bankabygninginum. Niels Finsensgøta.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 176/16 | 16/01841-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 141/16 | 16/01841-1 |
| 3 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 182/16 | 16/01841-1 |

**Málslýsing:**

Kommunan hevur havt samráðingar við Visit Tórshavn um leigumál í bankabygninginum.

Sum er heldur Visit Tórshavn til í hølum hjá P/F H.N. Jacobsens Bókahandli, og hevur hesin leigusáttmálin 6 mánaða uppsagnartíð.

Tískil er neyðugt at rinda leigu fram til og við 01.12.2016 um ikki onnur avtalað fæst um hetta leigumálið.

So skjótt sum hølini eru klár í bankabygninginum flytir Visit Tórshavn niðjan, og er neyðugt at finna eina loysn uppá leiguna fyrstu tíðina, vísandi til verandi leigumál í verandi hølum hjá P/F H.N. Jacobsens Bókahandli.

Leigumálið í Niels Finsensgøtu umfatar 133m2 í veghædd, 39m2 goymslurúm í kjallara hædd og 1/3 av felags køki sum er 23m2.

Leigan er 1.000 kr.m2.pr.ár fyri høli í veghædd og 500 kr.m2.pr.ár fyri goymsluhøli og felagshøli í kjallara.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at gera ein 10 ára leigusáttmála við møguleika fyri framlonging og til vanligar treytir.

Leigusáttmálin verður óuppsigiligur í 10 ár frá eigarans síðu, meðan leigarin kann uppsiga leigusáttmálan við eitt árs freist.

Verandi leigusáttmálið við P/F H.N. Jacobsens Bókahandil verður uppsagdur við stytst møguligari freist, og verður leiga ikki kravd fyri leigumálið í Niels Finsensgøtu, fyrr enn sáttmálin í Bókahandlinum er farin úr gildi.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 183/16 Bankabygningur Niels Finsensgøta. Útleigan av atkomuhædd og part av kjallarahædd.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 121/16 | 16/01556-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 179/16 | 16/01556-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 138/16 | 16/01556-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 183/16 | 16/01556-1 |

**Málslýsing:**

Uppskot er gjørt til innrættan av atkomuhæddini í bankabygninginum í Niels Finsensgøtu.

Ætlanin umfatar eitt torg + 3 leigumál.

Kommunan hevur verið í samráðingum við Visit Tórshavn og Tjaldursapotekið um leigumál.

Ætlanin umfatar at:

- Tjaldurs apotek leigar 62,6m2 í atkomuhædd til útsølu, 51,7m2 í kjallara til goymslu + 1/3 av felagsøki í kjallara.
- Visit Tórshavn leigar 133m2 av atkomuhædd, 39 m2 í kjallarahædd til goymslu + 1/3 av av felagsøki í kjallara.
- Lýsa eitt leigumál til leigu á 60m2 í atkomuhædd, 15,5 m2 í kjallara + 1/3 av felagsøki í kjallara.

Kommunan ynskir at hava eitt ávíst fjølbroytni í virkskeminum í býnum, og verður mett, at kommunan kann leiga út til Apotek og Kunningarstovu, uttan at leigumálið verður bjóða út.

Talan er um alment virksemi sum ikki liggur í beinleiðis kapping við privatu vinnuna. Virksemið hevur kommunalan áhuga, og tekur býarskipanarlig atlit.

Leigumálið, ið verður boðið út, verður við treytum fyri hvat virksemi skal vera, og er ætlanin at seta sum treyt, at talan er um Café.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at leiga atkomuhæddina og partar av kjallarahæddini í bankabygninginum í Niels Finsensgøtu út til Visit Tórshavn og Tjaldursapotek.
Endaligar treytir við meira verða avgreiddar í samráð við útleigara, og verða leigumálini síðani fyriløgd fíggjarnevnd.

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at lýsa eitt leigumál leyst til útleigan, við treytum um at talan skal verða um café.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Málslýsing:**

Leigumálið hevur verið lýst leyst við umsóknarfreist til 02.05.2015.

Innan freist komu inn hesar umsóknir.

**Gómagátt.** ( Kirstin og Høgni Hammer )
Umsøkjarin heldur í dag til í leigaðum hølum, har framleiddar verða dygdar sjokolátavørður.

Felagið leggur stóran dent á góðskuna. Alt verður gjørt við hond úr bestu rávørum, og í størst møguligan mun úr føroyskum rávørum. Tey leggja dent á ikki at koyra haldevni í vørurnar. Hetta gevur vørunum ein reinari og betri smakk.

Felagið ætlar at flyta sjokolátaframleiðsluna oman í býin, og harumframt at reka útsølu og café á staðnum. Ætlanin er at framleiða og selja nýgjørda konfekt, køkur dessertir og bollar, sum kunnu serverast á staðnum við kaffi og líknandi. Talan verður bara um vørur sum verða framleiddar á staðnum. Hølini verða sostatt innrættaði til framleiðslu, útsølu og café.

**Brell Café.** ( Róaldur Jákupsson )
Umsøkjarin hevur ætlanir um at selja okkurt fastfood líknandi sum kann servera take-away kaffi skjótt og í rímuliga stórum mongdum. Umsøkjarin metir, at nógv fólk fara at ferðast ígjøgnum bygningin alla tíðina, og at ein stemningur av farti og skundi verður. Umsøkjarin hevur ætlanir um at lata upp eitt super trendy stað við modernaðari útsjónd, har hann fer at brúka umhvørvisvinarlig take-away íløt og eisini nýbrent fairtrade kaffi.
Ætlanin er at seta upp eina stóra espressomaskinu við 3-4 statiónum, sum kann levera nógvar drykkir í senn uppá stutta tíð. Umsøkjarin ímyndar sær eitt stað, har mann kann standa, sita ganga hvør um annað við sínum kaffi. Ætlanin er eisini at selja sunnar og skjótar skundverðir frá lokalum veitarum. Hann vísir til at talan er ikki um eitt vanligt fastfood stað við ljótum plastikk pang farvum og vánaligum kaffi. Hann vil vísa at man saktans kann bjóða nógv nýbrent dygdarkaffi, skjótt og effektivt, og samstundis hava ein góðan modernaðan og burðardyggan stíl.
Umsøkjarin tekur saman um og greiðir frá, at hann vil gera eina burðardygga fastfood café, har hann brúkar føroyskar veitarar. Allar vørur skulu ver aporførar og helst lokalar, og íløt skulu vera umhvørvisvinarlig.
Hann vísir til at hann nýligani er byrjaður at reka café í miðbýnum. At caféin hevur fingið góða móttøku, men er stóri vansin, at hann ikki kann kenna seg tryggan í leigumálinum, vísandi til at leigumálið hevur 3 mðr. uppsøgn, og at ætlanir eru at um byggja hotel á økinum.

Birgit Andersen og Guðrið í Bartalsstovu.
**( Reka Tórscafé í Bókasavninum )**
Tær vísa til at tær í 7 ár hava selt pannukøkur ( crepes ) á gongugøtuni um summari, á jólum og á skoytubreytini.
Síðan november 2015, hava tær rikið Tórs Café á gongugøtuni.

Tær vísa til at tær seta kundan í miðdepulin og selja dygdargóðar vørur. Tær virða kundan, og ynskja at skapa eitt gott og fjálgt umhvørvi, har fólk trívast.

Ætlanin er at lata upp eina lagkøkukafé – køkutorg. ( samanber við Lagkagehuset í Danmark ) Ætlanin er at selja smákøkur, formakøkur, eplakøku v.m. Ætlanin er somuleiðis at hava drýl við føroyskum viðskera, umframt eitt stórt úrval av kaffi og te.
Eisini er ætanin at selja frukt- heilt og skori grønmeti. Vísandi til at ongin kiosk er í miðbýnum, umhugsa tær at hava eina kiosk við minni úrvali av kioskvørum.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at leiga hølini út til Gómagátt.

Talan verður um 10 ára leigumál til vanligar treytir, og við møguleika til at leingja um leigumálið. Eigarin kann ikki siga leigumálið upp fyrstu 10 árini, meðan leigarin kann uppsiga leigumálið við eitt árs freist.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 184/16 Tjaldurs Apotek. Leigumál í bankabygninginum í Niels Finsensgøtu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 178/16 | 16/01842-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 140/16 | 16/01842-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.05.2016 | 196/16 | 16/01842-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 184/16 | 16/01842-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 210/16 | 16/01842-1 |

**Málslýsing:**

Kommunan hevur havt samráðingar við Tjaldurs Apotek um leigumál í bankabygninginum.

Tjaldurs Apotek hevur áhuga í at lata upp útsølu við apoteksvørðum í miðbýnum. Í fyrsta umfari verður ikki talan um receptvøru, men kann hetta koma uppá tal seinni.

Leigumálið í Niels Finsensgøtu umfatar 62,6m3. Í veghædd 51.7m2 goymslurúm í kjallara og 1/3 av felagskøki sum er 23m2.

Leigan er 1.000 kr.m2. pr.ár fyri høli í veghædd og 500 kr.m2.pr.ár fyri goymsluhøli og felagshøli í kjallara.

Annars verður talan um 10 ára leigumál við møguleika fyri framlonging. Leigarin kann siga leigumálið upp við eitt árs freist.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at gera 10 ára leigusáttmála við møguleika fyri framlonging og til vanligar treytir.

Leigusáttmálin verður óuppsigiligur í 10 ár frá eigarans síðu, meðan leigarin kann uppsiga leigusáttmálan við eitt árs freist.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti.**

Tjaldurs Apotek vísir til, at tað var kommunan sum ynskti at Apotekið byrjaði eina útsølu í miðbýnum. Síðani hevur verið samráðst út frá teirri fortreyt, at kommunan hevur ein áhuga í, at Apotekið letur upp eina útsølu í miðbýnum. Mett varð, at hetta kundi geva eitt ískoyti til

virksemið og trivnaðin í býnum. Talan skuldi vera um eina royndartíð í eitt ár, har leigan er uttan gjald, og ein eftirmeting skuldi síðani gerast um eitt ár.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. maj 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti.**
Kommunan hevur havt samráðingar við Tjaldurs apotek.

Leigusáttmálin varð viðgjørdur og leigumálið tekur við 1. september 2016.
Fyrsta árið er royndartíð, og er leigugjaldið fyrsta árið helvtin av fullum ársgjaldi.

Sí undirskrivaðan leigusáttmála, sum tó er treytaður av býráðssamtykt.
Skjal nr. 16/01842-12.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Sjúrður Olsen taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge, taka ikki undir við tilmælinum og mæla til at rindað verður vanligt leigugjald.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við átta atkvøðum fyri og einari ímóti.

Tey, sum atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen.

Bogi Andreasen atkvøddi ímóti.

Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal greiddu ikki atkvøðu.

# 185/16 Leigumál neyst úti á Bakka, Froskmannafelagið. Matr.nr. 151 d & 151 e

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 211/16 | 16/02102-1 |
| 2 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 185/16 | 16/02102-1 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar Froskmannafelag og Kajakfelagið, sum í løtuni ikki hava felagshøli, hava boðað frá, at tey eru áhugaði teimum pørtunum av tveimum av kommunalu neystum undir Bakka (matr nr. 151d og 151e), ið eru tøk.

Í hesum sambandi hevur verið samskift við feløgini og Norðlýsið, ið hevur nakað av útgerð í innara neystunum, um, hvussu økini og neystini kunnu skipast.

Fyri at tryggja ein einfaldan leigu sáttmála og samskifti, er semja um, at Tórshavnar Froskmannafelag stendur fyri leigusáttmálunum, hevur ábyrgdina av leigumálunum og stendur fyri samskiftinum við kommununa. Hetta bæði viðvíkjandi matrikul 151d og partinum av matr. nr. 151e ið leigumálið umfatar.

Avtalað er, at feløgini síðan sjálvi skipa virksemi í økinum og í hesum sambandi í felag gera reglur fyri øki og ognunum, innanfyri teir karmar kommunan setur.

Um ósemjur stinga seg upp viðvíkjandi t.d. nýtsluni av hølunum ella omanfyristandandi reglugerð, og semja ikki fæst, tekur Tórshavnar kommuna avgerð.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at góðkenna uppskot til leigusáttmála, viðheft.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 186/16 Orkusparandi tiltøk – gøtuljósíløgur 8275

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 64/16 | 16/02044-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 218/16 | 16/02044-1 |
| 3 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 186/16 | 16/02044-1 |

**Málslýsing:**
Sum liður í royndini at minka um orkunýtsluna, hevur býráðið avsett kr. 2 milliónir til orkusparandi tiltøk innan gøtuljós á íløgum fyri 2016.
Slík tiltøk eru í høvuðsheitum LED-ljós og tráðleysar stýringar. LED ljós lækka orkunýtsluna við 60-70%.
Ikki er so lætt at seta tal á sparing í smb. við tráðleysu stýringina, men roknast kann við 10-15 %.
Hinvegin fær ein nógv neyvari stýring, so at ljósini tendra og sløkna tá tey skulu, og hetta er borgarin glaður fyri.

Fyri at fáa sum mest burturúr játtanini og við atliti til ”Gulu ætlanina” mælir leiðarin fyri gøtuljósdeildina til at býta upphæddina so, at kr. 400.000 verða nýttar til stýringar og kr. 1.6 millión til LED ljós.
10 stýringarnar á kr. 40.000 verða settar í tey skáp, sum í dag brúka mestu orkuna.

| | | | |
|---|---|---|---|
| LED-ljós: | | | |
| <u>Høvuðsvegir</u>: | | | |
| 151 stk. ClearWay á 50 W á kr. 2.800 = | kr. 422.800 | | |
| <u>Miðbýur- Býlings- & sethúsavegir</u>: | | | |
| 284 stk. Parklyktir á 40 W fyri | kr. 1.400.000 | | |
| <u>Ókent</u> : | | | |
| Arbeiðsløn og eykalutir | <u>kr. 177.200</u> | <u>kr. 2.000.000</u> | |
| Mett árlig sparing: | | | |
| <u>LED</u>: | | | |
| (151x(160-50)+284x(70-40))x3.500x1.43x1,0625 = | kr. 133.637 | | |
| <u>Stýriskáp</u>: | | | |
| 25.000 x 1,43 x 1,0625 = | <u>kr. 37.984</u> | <u>kr. 171.620</u> | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri gøtuljósdeildina mæla til at játta kr. 2 milliónir av markaðu íløgunum fyri 2016, konto 8275 ”orkusparandi tiltøk innan gøtuljós” til íløgur samsvarandi omanfyri standandi, og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

## 187/16 Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 54/14 | 14/00772-13 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2015 | 2/15 | 14/00772-13 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2015 | 14/15 | 14/00772-13 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 37/15 | 14/00772-13 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.03.2015 | 32/15 | 14/00772-13 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 243/15 | 14/00772-13 |
| 7 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 312/15 | 14/00772-13 |
| 8 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 245/15 | 14/00772-13 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 74/16 | 14/00772-13 |
| 10 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 11 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 75/16 | 14/00772-13 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 126/16 | 14/00772-13 |
| 14 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 175/16 | 14/00772-13 |
| 15 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 144/16 | 14/00772-13 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 171/16 | 14/00772-13 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 178/16 | 14/00772-13 |
| 18 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 240/16 | 14/00772-13 |
| 19 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 187/16 | 14/00772-13 |

**Lýsing av málinum:**

Í sambandi við fyrispurningar um nýggjan kirkjugarð í Hóyvík, hevur umsitingin gjørt uppskot til staðseting fyrr ávíst 5 ymiskar staðsetingarmøguleikar (j. nr. 2007-2037/4). Arbeitt hevur verið víðari við at kannað um eisini aðrir staðsetingarmøguleikar eru, og verður hervið víst á eitt økið afturat. Økið sum talan er um, liggur oman fyri sambindingarvegin millum Inni á Gøtu og framtíðar innkomuvegin til Tórshavn, sum framhald av Dalinum Langa.

**Byggisamtyktin:**
Verandi serstaka byggisamtykt fyri hetta økið varð gjørd í sambandi við býarpartin Stórutjørn. Stórur partur av økinum er D2 og har, sum hetta endar eystureftir, stingur ein kíli av 4. grundumráði, hagi, seg inn millum D2 og A3 bústaðarøkið Inni á Gøtu.

**Økiseyðkenni:**
Norður-suðurgangandi dalskap við norðurendan av Dalinum Langa. Dalurin ella lægdin liggur nakað burtur frá Sambindingarvegnum (Klingran) og eru góðir møguleikar at staðseta bygningar og parkeringsøki skamt frá vegnum. Í lívd av eysturhallandi skráa liggur vesturhallandi slætti við stórbærum útsýni norðureftir móti Sundalagnum og tí vakra Skálafirði.

**Nærøkini:**
Økið liggur vart og er ikki áloypandi í lendinum, millum 5 og 20 metur hægri enn bústaðarøkið Inni á Gøtu, og partvís afturundir lítla heygnum millum bæði økini.

**Víðkanarmøguleikar:**
Samlað økisvídd er 25.000 m², og góður møguleiki er at byrja við 3.500 - 5000 m² í lægdini undir brekkuni, fyri síðan at víðka norðureftir.

**Atkomuviðurskifti:**
Tætt við sambindingarveg, ið kann leiða nógva bilferðslu. Siðvenjan at ganga í gravarfylgi er komin til eitt vegamót, men eru her møguleikar, tí í beinari linju eru 950 m til kirkju og samkomuhús ígjøgnum fríøkið Dalurin Langi. Til sammetingar er beina leiðin millum Dómkirkjuna og kirkjugarðin við Velbastaðvegin 1250 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Ongin fígging er avsett til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík. Útvegan av kirkjugarði í Hoyvík er ikki átrokandi, við tað at verandi kirkjugarður í Tórshavn hava nøktandi pláss enn.

**Niðurstøða.**
1. Kirkjugarður á hesum stað vil ikki ávirka verandi býarbygging.
2. Tað er av týdningi at kirkjugarðurin kann víðkast.
3. Kirkjugarðurin kann vera partur av frílendisætlan fyri býarbygging í Hoyvíkshaganum.
4. Siðvenja er at leggja kirkjugarðar uttanfyri býir og bygd øki, fyri síðan at býurin nærkast og at enda fevnir um økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til staðsetingarmøguleikar út frá fyriliggjandi uppskotum, og um arbeiðast skal víðari við málinum, og um so er, at játtað pening til fyrireikingar, herundir kanningar og projektering av skitsuuppskotinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Formaðurin hevur ynskt málið á skrá til ummælis

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Um arbeiðast skal víðari við málinum, kann víðari gongdin í málinum verða:

1. Keyp av lendi
   Keyp av lendi 25.000 $m^2$ av matr. 135ed Hoyvíkshagi 3,5 mill.
2. Gerð av forprojekti
   Gera forprojekt til myndugleikaviðgerð
3. Borgarakunning
   Hava kunningarfund fyri borgarunum í Hoyvík
4. Myndugleikagóðkenning, friðingarnevndir, Føroya Stift
   Náttúru- og yvirfriðingarnevndarloyvi og loyvi frá Føroya Stift, kunngerð um kirkjugarðar.
5. **Projektering/útbjóðingartilfar og útbjóðing**
   At bjóða út til tvey projekterandi feløg at projektera, gera útbjóðingartilfar, bjóða út og hava lisitatión
6. Tíðarætlan
   Tíðarætlan keyp av lendi medio 2015, loyvir ultimo 2015, projektering og útbjóðing medio 2016 arbeiði kann byrja aftaná summarfrítíðina 2016.

Peningur er tøkur á karminum 6575 fyri 2014, men onki er játtað, til víðari arbeiði við málinum. Eingin fíggjarkarmur er avsettur á íløgum 2015.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at taka støðu til, um verkætlanin skal setast í verk eftir leistinum sum skotin er upp, og um neyðugur fíggjarkarmur skal játtast til verkætlanina komandi ár, fyri 2016.
Verður avgjørt at arbeiða víðari við málinum, skal málið til teknisku nevnd til viðgerðar og fíggjarnevndina til samtyktar at leggja fyri býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2015:** Útsett til komandi fund, tá tað verður lýst og framlagt í sambandi við staðsetingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Tekniska nevnd 04. mars 2015**: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt kravfestingar til málið um kirkjugarðin í Hoyvík, sí hjálagda skjal. Fyrsta byggistig fevnir um gerð av lendi til 320 gravir, at skipa atkomuveg og parkeringspláss til 72 bilar, at byggja lítið arbeiðshús til amboð og uppihald. Umframt at garðurin skal girðast inni.

Kravfestingarnar siga, hvussu nýggi kirkjugarðurin ynskist skipaður. Kravfestingarnar eru grundskjal undir uppskoti til skipan, projektering, myndugleikagóðkenning/Føroya Stift, friðingarviðgerð, og til løgdeildina at fyriskipa og fremja keyp av lendi frá Búnaðarstovuni. Ætlan er at bjóða projekteringina út í innboðnari lisitasjón. Tilboðini verða løgd fyri nevnd aftur, tá tey eru innkomin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við kravfestingarskjølunum, at bjóða projekteringina út, og at beina málið til løgdeildina at keypa lendi.
Mælt verður eisini til at játta kr. 500.000,- av karminum á konto 6275 Kirkjugarðar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 02. december 2015: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.**

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 10. desember 2015: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
**Kirkjugarðurin í Hoyvík hevur verið úti í kapping, har tvær ráðgevarafyritøkur vórðu bidnar um at koma við einum skipanaruppskotið til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík, umframt tilboði upp á ráðgevarakostnað fyri 1. byggistig. Skipanaruppskotið varð vektað við 25% og ráðgevarakostnaðurin varð vektaður við 75%.**

**Fríggjadagin 26. februar 2016 komu undirhondsboðini frá tveimum ráðgevarafyritøkum inn.**

**Kostnaðarstøðið fyri ráðgevingina av 1. byggistigi var høgt og var eisini stórur munur millum tey tvey tilboðini, sum vórðu latin inn. Harumframt vóru kostnaðarmetingarnar fyri bygging av byggistigunum eisini høgar, og sostatt metti dómsnevndin, mannað av umsitingini, at vegna høga kostnaðarstøði, er ikki ynski at taka av nøkrum av tilboðunum, men heldur lata Býarskipan arbeiða víðari við verkætlanini, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samsýna bjóðarunum kr. 25.000 í part fyri luttøkuna, og at býarskipan arbeiðir víðari, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Býráðsfundur 17. mars 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeitt verður við skipan av kirkjugarðinum. Býararkitekturin kemur at greiða frá tilgongdini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016: Kunnað varð um málið.**

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til Kirkjugarðin í Hoyvík, sí viðheftu skjøl (14/00772-38, 1,2,3,4)

Í fyrsta byggistigi er pláss fyri umleið 380 gravum. Afturat tí er pláss fyri barnagravum, urnugravum og felagsøki við plássi til starvsfólk. 1. stig fevnir eisini um arbeiðsveg frá Klingruni inn á arbeiðsøkið, umframt útgrevstur til parkeringspláss. Umsitingin metir, at atkomuvegur og parkeringspláss eiga at vera ein sjálvstøðug teknisk verkætlan.

Skotið verður upp í fyrsta lagi at bjóða 1. byggistig út í undirhondsboð. Í útbjóðingini verða hesi arbeiði gjørd:

*Flytan og niðurtøka av verandi stiki/hegni*
*Arbeiðsvegur inn á kirkjugarðsøkið frá Klingruni*
*Avgrevstur og burturbeining av tilfari av 1. byggistigi*
*Avvatning*
*Møgulig spreinging*

Tá øll neyðug loyvi frá myndugleikum, keyp av lendi og broyting av byggisamtykt er fingin til vega, verður útbjóðingartilfarið sent út til 2 arbeiðstakarar. Arbeiðstakararnir, ið eftir ætlan sleppa at bjóða, vera:
P/F Hansen & Jakobsen
Sp/f Hellisdal
Byrjað verður eftir ætlan 1. juni, og hetta arbeiðið er mett at taka 5 mánaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at bjóða 1. byggistig út í undirhondsboð eftir omanfyri standandi lýsing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Ískoyti.**
Løgdeildin hevur kannað møguleikarnar fyri at keypa lendið frá Búnaðarstovuni.

Festarin er hoyrdur og eru allir formalitetir í samband við avlýsing av tinglýstum, leigusáttmála og deklaratión á ognini eisini avgreiddir.

Búnaðarstovan hevur sent kommununi eina fyribils tilsøgn, keypsprísur 2.311.500,00.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at keypa lendið fyri 2,4 mill. kr. sum verður fíggjað av íløgukarminum 2016 á 6575 kirkjugarðar.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Frank Hellisdal og Sp/f ZRJ geva tilboð uppá 1. byggistig tann 6. juni 2016. Umsitingin viðger innkomnu tilboðini og ger tilmæli til fundin. Tilboðini verða løgd í málið og kunnu síggjast á nevndarportalinum frá 7. juni 2016.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal og Sp/f Z.R.J hava givið tilboð uppá 1. byggistig tann 6. juni 2016. Umsitingin hevur viðgjørt innkomnu tilboðini. Tilboðini eru løgd í málið og kunnu síggjast á nevndarportalinum frá 7. juni 2016.

2 tilboð eru innkomin. Tey eru áljóðandi:

Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal 5.159.000,00 kr. uttan mvg

Sp/f Z.R.J 2.683.043,00 kr. uttan mvg

Sp/f Z.R.J. hevur gjørt vart við eina roknivillu í tilboði teirra. Endaliga tilboðið er 4.340.543 kr. uttan mvg., og hetta stendur Sp/f Z.R.J. við. Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera 1. byggistig. Samlaði kostnaðurin er 5,4 milliónir.

Játtaðar eru kr. 500.000 til projektering. Av hesum eru kr. 405.000 eftir.
Á karminum til kirkjugarðar eru kr. 1.795.000. Neyðugt er sostatt við fígging 3,2 mió. afturat

Støða skal takast til, um takast skal av tí lægsta tilboðnum frá Sp/f Z.R.J. og hvussu restupphæddin á 3,2 mió. skal fíggjast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016: Útsett.**

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað málið. Umsitingin hevur sett seg í samband við sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, har kunnað hevur verið um málið, at lægri tilboðsveitari, Sp/f Z.R.J., hevur gjørt eina roknivillu og at endaligi tilboðsprísurin hjá Z.R.J. er 4.340.543 kr. uttan mvg. Umsitingin hevur heitt á sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal at koma við einum nýggjum tilboði, grundað á sama útbjóðingartilfar.
Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal boða frá, at teir standa við sítt tilboð, áljóðandi 5.159.000,00 kr. uttan mvg, og at um tilboðið skal broytast ella regulerast, er neyðugt at útbjóðingargrundarlagið eisini verður broytt.

Endaliga tilboðið hjá sp/f Z.R.J. er 4.340.543 kr. uttan mvg. Hetta stendur sp/f Z.R.J. við.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera 1. byggistig. Samlaði kostnaðurin er 5,4 milliónir.

Játtaðar eru kr. 500.000 til projektering. Av hesum eru kr. 405.000 eftir.
Á karminum til kirkjugarðar eru kr. 1.795.000. Neyðugt er sostatt við fígging á 3,2 mió. afturat.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum hjá sp/f Z.R.J. áljóðandi 4.340.543 kr. uttan mvg.
Eisini verður mælt til at fíggja restupphæddina á 3,2 mió. av íløgukarminum á 6275, Fríðkan av kommununi, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Samstundis verður heitt á umsitingina um at hava greiðar reglur, tá roknifeilir, sum ávirka prísin, verða staðfestir í tilboðum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Annnfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 188/16 Kommunala Brennistøðin : Endurnýggjan av ketlinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 131/14 | 14/01698-78 |
| 2 Fíggjarnevndin | 01.05.2014 | 107/14 | 14/01698-78 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2014 | 99/14 | 14/01698-78 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2016 | 38/16 | 14/01698-78 |
| 5 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 220/16 | 14/01698-78 |
| 6 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 188/16 | 14/01698-78 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ketilin á KB er frá 1987, og er nú sostatt umleið 22 ára gamal. Partar av ketlinum vórðu skiftir í 1989, vegna framleiðslufeil. Livitíðin á einum ketli er natúrliga avmarkað, tó uttan at til ber við vissu at siga, hvussu long livitíðin er.

Í 2006 varð ovnurin høvðusumvældur, eins og framkomin roykreinsiskipan varð bygd. Ímillum hesar báðar høvðuspartar er triði høvuðspartur í annlegginum, nemliga ketilin, sum einki varð gjørt við í.s.v. høvuðsumvælingina.

**Grundarlag og uppgávulýsing**
KB hevur seinastu árini gjørt kanningar og metingar fyri at kunna finna fram til røttu loysnina og røttu løtuna at endurnýggja ketilin. Grundarlagið ella fortreytirnar fyri kanningunum og metingunum eru hesar "uppgávulýsingar":

- At aldur og slit á ketlinum viðføra:
- Rakstrarsteðgir vegna umvælingar, sum minka um tøka brennitíð
- Brenniorkan minkar, tá ið rør verða proppað vegna lekar
- Um illa vil til, kunnu álvarsamir feilir leggja annleggið lamið í longri tíð
- At tekniskir trupulleikar eru við rakstrinum av filtrinum, vegna ov høgan hita á roykinum úr ketlinum.
- At núverandi ketil krevur manuella reinsing umleið 10. hvønn dag. Hetta ber til, við niðursettari last, men minkar um brennitíðina og harvið mongdina, sum kann brennast.
- At annleggið verður fyrireikað tekniskt og í mun til brenniorku til eina hóskandi restlivitíð, soleiðis at gjørdar íløgur í ovn og filtur verða gagnnýttar sum longst.

<u>Viðv. 1: Aldur og slit.</u>
Seinastu árini eru hesar uttanhýsis kanningar av ketlinum gjørdar (j.nr. 2009-2549/1):

- 2004: Babcock & Wilcox Vølund : Tilstandsrapport
- 2006: Force Technology: Ultrasonic Thickness Examinination (IRIS)
- 2008: Babcock & Wilcox Vølund : Inspektions- og tykkelsesmålerapport

Kanningin frá 2004 vísti, at ketilin sum heild er í góðum standi, men at innanfyri eitt tíðarskeið á uml 6 ár kann roknast við at rørini skulu skiftast.

Í kanningin frá 2006 varð tjúktin á rørunum máld við stikkroyndum (54 av 414 rørum). Minst málda rørtjúkd var 2,8 mm.

Í kanningini frá 2008 vórðu eisini gjørdar tjúkdarmátingar (stikkroyndir), og minst málda rørtjúkd var 2,8 mm. BWV metti tá, at ketilin var í sera góðum standi, og at vænta, at ketilin

kann vera í rakstri í nøkur ár aftrat (einki áramál "garanterað"!). Mett varð, at neyðugt er ikki at skifta rørini í løtuni.

Seinastu árini hava nakrir lekar verið á ketlinum. Serliga seinasta árið hava fleir lekar verið. Hesir lekar benda á, at livitíðin nú er avmarkað til rættiliga fá ár aftrat. Tað serliga við slíkum trupulleikum við eldri ketlum, ið byrja at leka er, at lekar koma títtari og títtari fyri, og bráddliga kann støðan gerast álvarsom.

Kommunala Brennistøðin hevur heitt á Rambøll um, við støði í gjørdu kanningunum, at meta um støðuna og livitíðina hjá ketlinum (j.nr. 2005-2549/9). Teirra niðurstøða er, at livitíðin er fá ár, og at 5 ár ikki kunnu garanterast.

Tekniski leiðarin og rakstrarleiðarin á KB hava sjálvsagt eisini loypandi mett um støðuna á ketlinum, sí frágreiðing tekniska leiðarans (j.nr. 2009-2549/10). Teirra meting og niðurstøða er, at livitíðin er avmarkað til 3-5 ár aftrat, og at renovering má vera byrjað innan 3 ár. Í frágreiðingini verður eisini sagt, at 2% av rørunum eru proppað vegna lekar, umframt at aðrir lekar hava verið. Proppaðu rørini viðføra minni kapacitet á ketlinum, hægri roykhita, sum aftur gevur trupulleikar í filtrinum.

Viðv.2: Tekniskir trupulleikar við rakstrinum av filtrinum
Hitin á roykinum frá ketlinum er í hægra lagi, í mun til raksturin av roykreinsiskipanini. Neyðugt er at sproyta nógv vatn inn í roykin fyri at køla, og tað vísir seg at vera sera trupult tekniskt at fáa hetta at rigga nóg væl. Úrslitið gerst, at øska byggist upp í konditioneringstorninum, sum at enda kann loypa niður og steingja fyri roykrásini, og tað er ein sera álvarsom støða, tí heitu roykgassini sleppa ikki burtur vanliga vegin, men mugu út gjøgnum op o.t. í ovninum.

Hetta viðførir
- Rakstrarsteðg (mist brennitíð)
- Yvirupphiting av ketli og ovni, sum aftur er orsøk til at ketilin verður termiskt belastaður og harvið slítist meira
- Dálking av ovnhøll og filturhøll
  Fyri at loysa hendan trupulleika er neyðugt at lækka hitan á roykinum frá ketlinum, og tað kann gerast antin við einum størri ketli ella við einum "economisara" millum ketilin og filtrið.

Viðv. 4:
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini heldur, at rættast er at gagnnýta gjørdu íløgurnar í 2006 sum longst, áðrenn eitt heilt nýtt annlegg verður bygt. Í hesum sambandi eru tvey ymisk tíðarskeið (planperiodur) mett, eitt stutt (5-10 ár) og eitt longri (12-18 ár). Væntast kann, at nøgdirnar at brenna økjast líðandi við tíðini, og tí er neyðugt at fremja tiltøk, sum kunnu økja um brenniorkuna, fyri at kunna nøkta tørvin, sum verður mettur til minst 20.000 T/ár í longra tíðarskeiðnum. Somuleiðis er væntandi, at brennivirðið økist komandi árini, og ávirkar hetta brenniorkuna negativt.

**Loysnir**
Kommunala Brennistøðin hevur í samráð við Rambøll biðið veitaran av annlegginum Babcock & Wilcox Vølund um at koma við uppskotum til loysnir og kostnaðarmetingum uppá áður nevndu "uppgávulýsingar". Rambøll hevur síðani mett um hesi uppskot og skrivað eitt notat við tilmæli um hvørja loysn Rambøll metir vera ta bestu.

Uppskotini til loysn eru hesi (sí uppskotini í síni heildí málinum, j.nr. nevnd niðanfyri, eins og meting hjá Rambøll, j.nr. 2009-2549/9):

- **Renovering av verandi ketli** (útskifting av roykrørum), j.nr. 2009-2549/3:
  *Uppskot 1 er einans ein stuttskygd høvuðsumvæling av ketlinum (styttra tíðarskeiðið, 10 ár), men loysir ikki trupulleikan við ov høgum hita til filtrið, ella við manuellu reinsingini av rørunum. Partar av ketlinum verða ikki skiftir, og er tí framvegis eins gamal og áður. Loysnin gevur ikki øktan kapacitet. Við hækkandi brennivirði kann væntast, at brenniorkan fellur til 15.000 T/ár. Orkuframleiðslan verður ikki økt.*
  *Kostnaðarmeting: 2,0 mió. (Rambøll).*

- **Innseta Economisara millum ketil og filtur**, j.nr. 2009-2549/6:
  *Uppskot 2 loysir trupulleikan við ov høgum hita til filtrið, umframt tað sum er nevnt undir uppskot 1. Brenniorkan kann við hesi loysn økjast við 1000 T/ár. Orkuframleiðslan verður økt umleið 10-15 %.*
  *Kostnaðarmeting: 7,5 mió, íroknað uppskot 1, renovering av ketli. (Rambøll).*

- **Útskifta ketilin við ein nýggjan størri av somu typu**, j.nr. 2009-2549/4:
  *Uppskot 3 loysir trupulleikan við ov høgum roykhita til filtrið, men ikki manuellu reinsingina av rørum. Allur ketilin verður skiftur. Brenniorkan verður økt til 20-22.000 T/ár, sjálvt við hækkandi brennivirði. Orkuframleiðslan verður økt 10-15%. Loysnin kann nýtast til longra tíðarskeiðið.*
  *Kostnaðarmeting: 10,0 mió. (Rambøll).*

- **Útskifta ketilin við ein nýggjan vatnrørsketil**, j.nr. 2009-2549/5:
  *Uppskot 4 loysir nevndu trupulleikar við ov høgum roykhita til filtri og manuellu reinsingini av ketlinum. Brenniorkan kann økjast til 24.000 T um árið. Orkuframleiðslan verður økt. Við 10% størri íløgu kann Brenniorkan økjast til 30.000 T, um ovnurin seinni verður um- og útbygdur. Kostnaðarmeting: 30.0-35.0 mió. (Rambøll).*

**Niðurstøða og tilmæli hjá Rambøll:**
Rambøll mælir til, at loysn nr. 3 (útskifta ketilin við ein størri av somu typu) verður vald. Hendan loysnin lýkur krøvini til brenniorkutørv í longru planperioduni (12-18 ár), eins og hendan loysnin loysir mest átrokandi trupulleikan við ov høgum hita til filtrið.

**Meting og niðurstøða hjá leiðaranum á Kommunalu Brennistøðini.**

| Loysn | Fyrimunir | Vansar |
|---|---|---|
| 1 | - Lágur kostnaður<br>- Stutt umbyggingartíð (2-3 vikur) | - Partar av ketlinum framvegis gamlir og kunnu fara at leka<br>- Loysir ikki trupulleikan við ov høgum hita til filtrið<br>- Manuell reinsing neyðug<br>- Økir ikki um brenniorkuna.<br>- Økir ikki um orkuframleiðsluna.<br>- Hóskar bert til styttru planperioduna |
| 2 | - Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur | - Partar av ketlinum framvegis gamlir og kunnu fara at leka<br>- Hóskar bert til styttru |

| | | |
|---|---|---|
| | - Brenniorkan økist (eitt sindur)<br>- Orkuframleiðslan økist eitt sindur (FHF)<br>- Stutt umbyggingartíð (3-4 vikur) | planperioduna<br>- Ein eyka partur, sum ikki er kendur frammanundan, skal byggjast inn í skipanina.<br>- Manuell reinsing neyðug<br>- Neyðugt við eyka kølikapaciteti |
| 3 | - Allur ketilin verður skiftur, harvið gerst rakstrartryggleikin stórur<br>- Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Brenniorkan økist<br>- Orkuframleiðslan økist (FHF)<br>- Hóskar bæði til styttru og longri planperiodu | - Manuell reinsing neyðug<br>- Neyðugt við eyka kølikapaciteti |
| 4 | - Allur ketilin verður skiftur, harvið gerst rakstrartryggleikin stórur<br>- Trupulleikin við ov høgum roykhita til filtrið verður loystur<br>- Ikki neyðugt við manuellari reinsing<br>- Brenniorkan økist nógv<br>- Orkuframleiðslan økist nógv (FHF)<br>- Hóskar bæði til styttru og longri planperiodu | - Kostnaðurin ov høgur í mun til nyttuna<br>- Ketilin er stórur (høgur) og krevur bygningsbroytingar<br>- Ketilin er torførari at reka, tí hann er meiri avanseraður. Umbyggingartíð 3-4 mánaðir.<br>- neyðugt við eyka kølikapaciteti |

Samanumtikið metir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini, at loysn nr. 3 (útskifta ketilin við ein størri av somu typu) er nógv tann besta loysnin, sæð í mun til kostnaðin og nyttuna, tá talan um um bæði styttru og longru planperioduna.

Vísandi til, at livitíðin á ketlinum verður mett at vera avmarkað til 3, kanska 5 ár enn, mælir leiðarin á Kommunalu Brennistøðini, at arbeiðið at endurnýggja ketilin eigur at vera gjørt í 2011. Tað er ikki rætt at bíða sum longst, grundað á hesi viðurskifti:

- vandi er fyri, at sum tíðin gongur, fer ketilin at leka meira, harvið koma rakstrarsteðgir, rør mugu proppast, og kapaciteturin fellur, og hitin hækkar til filtrið, sum fær enn størri trupulleikar
- Útskiftingin má ikki draga út, so at tað bráddliga gerst neyðugt at útskifta heil rørbunt ella øll rørini, beint frammanundan at ketilin skal útskiftast.
- Tað er best at fáa gjørt endurnýggjanina meðan rusknøgdirnar eru minst, og tað er í krepputíðum, annars vaksa rusknøgdirnar gjarna fyri hvørt ár sum gongur.
- Ein nýggjur ketil heldur gjarna í umleið 20 ár, og verandi annlegg verður neyvan í rakstri longri enn tað, og fyri at gagnnýta ein nýggjan ketil mest møguligt, ræður um at fáa hann í rakstur sum skjótast.

Framleiðslutíðin av einum nýggjum ketli er umleið 6-8 mánaðir, harumframt kemur tíð til planlegging, sáttmálasamráðing við veitara o.t. á umleið 6 mánaðar, so samanlagt tekur verkætlanin umleið 1-1,5 ár at fremja.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at tikið verður undir við at uppskot nr. 3 (Útskifta ketilin við ein nýggjan størri av somu typu) verður valt, og at útskiftingin verður gjørd í 2011. Samstundis verður mælt til, at nevndin tekur upp spurningin um fígging sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar, soleiðis at fyribils kr. 10,0 mió. u/mvg verða tøkar til útskifting av ketlinum í 2011.

**Heilsu- og Umhvørvisnevndin 6. oktober 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina spurningin um fíggingina í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Umrøtt, og verður viðgjørt í sambandi við langtíðaríløguætlanina.

**Ískoyti:**
Síðani málslýsing og tilmæli í hesum máli bleiv gjørt á heysti 2009, hevur brennistøðin á Bornholm, ið er nærum meinlík brennistøðini á Hjalla, havt útbóð og gjørt sáttmála um tekniska dagføring av støðini, herundir eisini ketlinum. Framleiðsla av nýggjum ketli til Bornholm er nú í gongd, og verður hann skiftur í september 2011.

Ráðgevi hjá BOFA var Rambøll, sum sostatt hevur nýggjar dagførdar upplýsingar viðvíkandi tekniskum loysnum og kostnaðum. Við støði í nýggju dagførdu upplýsingunum hevur Rambøll gjørt eina dagføring av notatinum frá september 2009, eins og nýtt tilmæli er gjørt, j.nr. 2009-2549-13.

Royndirnar frá útbjóðingini á Bornholm vísa at tann áður tilmælta loysn 3 er nú mett at kosta kr. 13 mió., í mun til áður mett kr. 10 mió.

Útbjóðingin vísti eisini, at at tað er gjørligt at fáa ein vatnrørsketil (loysn 4) fyri umleið kr. 16 mió., í mun til áður mett kr. 30-35 mió, og sum ikki krevur stórar bygningsbroytingar, sum áður hildið. Í fyrra notatinum var júst tikið fyrivarni fyri, at óvissan í.s.v. kostnaðurmetingin av hesi loysnini var størri enn viðvíkjandi hinum loysnunum, serliga tí loysnin varð mett at krevja bygningsbroytingar, og tí at neyðugt var við neyvum tilboðum frá veitarum av ketlum. Henda loysnin samsvarar einum nýmótans forbrenningsketli.

Grundað á hesar dagførdu upplýsingarnar, mælir Rambøll til, at velja loysn 4, sum er útskifting av ketlinum til ein vatnrørsketil, soleiðis sum gjørt er á Bornholm.

**Tilmæli:**
Grundað á nýggju upplýsingarnar í málinum, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini nevndini til at:

- Velja at fremja loysn 4, sum er útskifting av verandi ketli til ein vatnrørsketil eins og gjørt er á Bornholm og
- Heita á býráðið, um fíggjarnevndina, at raðfesta játtan á umleið kr. 16 mió. (u/mvg) til ketil, umframt umleið 0,5 mió. til ráðgeving á íløguætlanini, soleiðis at ketilin kann bíleggjast, skiftast og verða tikin í nýtslu innanfyri í mesta lagi 2 ár.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2011:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal og Maria Hammer Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í heilsu- og umhvørvisnevndini og játta kr. 0,5 mió. kr. av konto 7175, renovasjón (íløgur), til ráðgeving og útbjóðing.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sáttmáli um heildarráðgeving, í sambandi við útskifting av verandi ketli til ein vatnrørsketil, verður í næstum gjørdur við ráðgevarafyritøkuna Rambøll.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Kommunalu Brennistøðini mæla, við grundarlagi í fylgiskjali 1 í ráðgevarasáttmálanum, j. nr. 2009-2549/18, til, at arbeiðið, at gera ketilin, verður boðið út í innbodnari licitatión.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. mars 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
TK hevur móttikið 1. uppskot til útbjóðingartilfar uppá ketilin frá Rambøll, j.nr. 2009-2549/20. Samandráttur av útbjóðingartilfarinum og tilmæli frá Rambøll um útbjóðingarhátt og ketlaveitarar, verður sent limunum saman við skránni. Umsitingin hevur gjørt ymsar viðmerkingar til tilfarið, j.nr. 2009-2549/21.
Týdningarmestu høvuðstáttirnar í útbjóðingartilfarinum eru:

- Útbjóðingarháttur: Undirhondsboð sambært donsku "tilbudsinhentningsloven" (Løgdeildin er biðin um at kanna/viðmerkja løg-grundarlagið)
- Grundarlag fyri tillutan av ordra: "Det økonomisk mest fordelagtige tilbud" sambært donsku "tilbudsindhentningsloven".
- Metingarstøði undir "Det økonomisk mest fordelagtige tilbud":
  - Pris 60 Point
  - Teknisk kvalitet 30 Point
  - Tidsplan for færdiggørelse af leverancen 10 Point
  - Maksimum pointantal 100 Point
- Høvuðspunktir í uppksoti til tíðarætlan (kann samráðast um partar av tíðarætlan sambært útbjóðingartilfari):
  - 01/07-2012: Útbjóðingartilfarið sendast út
  - 31/08-2012: Tilboðsfreist
  - 01/11-2012: Undirskriva sáttmála
  - 15/07-22/09: Installatión / uppstart
  - 23/09-23/12: Royndarkoyring
  - 23/12-2013: Fyribils yvirtøka
- Uppskot til gjaldsætlan (kann samráðast sambært útbjóðingartilfari):
  - 1. rata (við ordra): 01/11-2012: 20% av sáttmálaupph.
  - 2 .rata (veitan av komponentum) 15/07-2013: 30% av sáttmálaupph.
  - 3 .rata (start royndarkoyring) 23/09-2013: 40% av sáttmálaupph.

- 4. rata (fyribils yvirtøka) 23/12-2013: 10% av sáttmálaupph.

Umframt veitingina av ketlinum, sum ketlaveitarin skal veita sambært umrødda útbjóðingartilfari, verða aðrar neyðugar byggiharraveitingar umfataðar av samlaða projektinum: Byggiharraveitingarnar eru í høvuðsheitum:

- Niðurtøka av verandi vatnkøliskipan og tilhoyrandi útgerð (s.s. kølarum)
- Gera rørgrøv fyri rørum til Fjarhitafelagið
- Veitan og uppsetan av vatnrørum frá bygningi og yvir til Fjarhitafelagið (og retur)
- Gera fundamentir til nýggjar kølarar og rørberarar
- Inniloka verandi kølaraøki, sum verður neyðugt at nýta til maskinútgerð (leggja tak á, skera hol í betongvegg fyri dupulthurð inn til verandi ketilrúm, seta hurðar og vindeygu í, og møguliga innbyggja hems/stáldekk við trappu)
- Møguliga nýtt trýstluftannlegg (sum eisini er optión í ketlaveitingini)
- Neyðugt verður helst eisini at gera nýggja El-innlegging til Jarnplássið, soleiðis at skrottpressan verður tikin av høvuðs el-talvuni á Brennistøðini, fyri at fáa nóg mikið av tøkum el-mátti á talvuna.

Til tess at kunna byrja fyrireikan av nøkrum av omanfyristandandi byggiharraveitingum, sum skulu samskipast við ketlaveitingina, hevur leiðslan á KB mett tað verið neyðugt at fáa gjørt visuellar skitsur av nýggju vatnkøliskipanini og tilhoyrandi útbúnaði (s.s. staðseting av kølarum, pumpum og kompressarum).

Skitsurnar verða ætlandi latnar ketlaveitarunum sum vegleiðing um, hvussu KB ynskir at køliskipan og komponentar verða staðsettir, og av tí at tær skuldu verða lidnar samstundis sum útbjóðingartilfarið, vóru ikki stundir at leggja mál um serstaka játtan fyri nevnd til støðutakan, áðrenn tær vóru bílagdar.
Skitsurnar eru gjørdar av Sofus M. Jacobsen, ráðgevandi verkfrøðingi, og vóru av SMJ mettar at kosta 40-50.000 kr. Leiðarin á KB metir ikki, at gerð av tílíkum visuellum skitsum eru partar av arbeiðnum hjá Rambøll, og tí verður biðið um at peningur verður játtaður til hetta arbeiðið av íløgum innan renovatiónsøkið.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu brennistøðini mæla til at:

- góðkenna útbjóðingartilfarið við viðmerkingum, sum umsitingin ger
- bjóða veitingina av ketlinum út sambært tilmælta útbjóðingarháttinum og til teir veitarar, sum Rambøll mælir til
- góðkenna uppskot til tíðarætlan og gjaldsætlan og samstundis fyrireika úutvegan av neyðugari játtan til 1. ratugjald, sum er 20% av sáttmálaupphædd (upphæddin er ikki kend enn, tí tilboð fyriliggja ikki, men verður væntandi um 2-3 mió. kr.), sum skal gjaldast 1. november 2012.
- játta kr. 60.000 + mvg til gerð av visuellum skitsum av §7, konto 7175 íløgur fyri renovatión 2012.
- beina málið um fíggjarnevnd í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2012:** Bárður Michelsen, leiðari á kommunalu brennistøðini, kunnaði um útbjóðingartilgongdina.

Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal, Jan Christiansen og Maria Hammer Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og játta kr. 60.000 umframt mvg til gerð av visuellum skitsum av §7, konto 7175 íløgur fyri renovatión 2012.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tilboð uppá útskifting av ketlinum og tilhoyrandi skipanum frá báðum veitarunum DPCT ávíkavist B&W eru móttikin tann 31/8-2012. Bæði tilboðini lógu væl hægri enn mett. Tískil varð í tveimum umførum roynt at fáa nýggj og endurskoðaði tilboð frá báðum veitarunum, fyri at kanna møguleikar fyri at fáa lækkað kostnaðin. Seinastu tilboðini vórðu móttikin ultimo nov./primo des. 2012, men úrslitið av royndunum broytti ikki munandi uppá prísin, meðan góðskan á veitingini lækkaði munandi. Hóast DPCT hevur funnið sparingar fyri ávíkavist áleið 1,5 og 2,5 mió., eru seinnu tilboðini tí minni áhugaverd enn tey fyrstu.

Víst verður til j.nr 2009-2549-44, sum er notat frá ráðgevaranum RAMBØLL *"Beslutningsnotat efter gennemgang af tilbud for renovering af TKKF's kedel og tilhørende udstyr"*, dagfest 20-01-2013, fyri eina neyva lýsing av útbjóðingargongdini, lýsing og sammeting av tilboðunum, grundgevingum fyri niðurstøðu og tilmæli um víðari framferð.

Niðurstøðan og tilmæli í nevnda notati er, at arbeiða víðari við tilboði 1 frá DPCT, sum verður mett at vera tað besta tilboðið, út frá einum heildarsjónarmiði grundað á teknisk, fíggjarlig og ábýrgdarviðurskifti (ábyrgd av samskipan, projekt- og byggileiðslu, processábyrgd, garantiskyldur), umframt at hetta tilboðið gevur bestu samlaðu framtíðartryggjaðu loysnina.

Tilboðini frá hinum veitaranum B&W eru væl hægri enn tilboðini frá DPCT á felags sammetingargrundarlagi, og tískil verður mælt til í fyrsla lagi at arbeiða víðari við DPCT.

Rambøll vísir á møguleika fyri at fremja útskiftingina yvir 2 fíggjarár (2013 og 2014), og hevur gjørt uppskot til tíðarætlan og cash-flow í hesum sambandi (í áðurnevnda notati, j.nr. 2009-2549/44).

Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting av øllum projektinum, j.nr. 2009-2549/45. Samlaður kostnaður fyri øll arbeiðir í.s.v. útskiftingina av ketlinum og tilhoyrandi skipanum, verður sambært kostnaðarmetingini kr. 28,7 mió. u/mvg ella 30,4 mió. v/6,25 % mvg. Í 2011 og 2012 er játtað í alt kr. 0,564 mió. Av tí at ávísir partar av arbeiðnum (múrverksarbeiði og útskifting av skakt) kann metast sum viðlíkahald/rakstur, verður mælt til at fíggja hesar partar av rakstrinum hjá KB. Tískil verður samlaði tørvurin at fíggja av íløgum kr. 29,034 mió. v/6,25 % mvg.

**Viðmerking frá Brennistøðini.**
Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini tekur undir við niðurstøðuni og tilmælinum frá Rambøll, um at tilboð 1 frá DPCT er besta tilboðið og at hendan "totala" loysnin samlað sæð er tann besta loysnin fyri Brennistøðina og Tórshavnar kommunu. Loysnin er teknisk góð, viðførir betri plássviðurskifti, betri arbeiðsumhvørvi og er ein framtíðartryggjað heildarloysn, sum einans fæst við at fremja alla loysnina undir einum.
Sera týdningarmikið er eisini, at í mun til seinnu tilboðini eru viðurskiftini í fyrsta tilboðnum viðvíkjandi processábyrgd, koordinerings- og projektleiðsluábyrgd, og garantiábyrgd greiðari og tryggari.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Avgerðin hjá heilsu- og umhvørvisnevndini 27. sept. 2011 tók støði í kostnaðinum av eini loysn, sum varð framd á einari brennistøð á Bornholm, sum er meinlík henni hjá Tórshavnar kommunu. Tað hevur tó víst seg, at veitarin hevur undirmett kostnaðin av ketilsloysnini á Bornholm, sum gjørdist munandi hægri. Tilboðið, sum Tórshavnar kommuna hevur fingið, svarar sambært Rambøll væl til tann kostnaðin, sum ketilin á Bornholm skuldi havt kostað. Tað er tískil púra ósannlíkt, at kommunan kann fáa eina loysn sum liggur nærhendis tí kostnaðinum, sum tað tá var mett at koma at kosta, at utskifta ketilin. Tilboðini geva eisini týðiliga ábending um tað.

Hetta broytir tískil fíggjarligu fortreytirnar munandi.

Málið um endurnýggjan av ketlinum varð reist í 2009, við tilmæli um at skifta ketilin í 2011. Fíggjarnevndin samtykti 18. november 2009 at viðgera tað í sambandi við langtíðaríløguætlanina. Útskiftingin bleiv tó útsett og ikki gjørd í 2011, orsakað av øðrum átrokandi íløgum.

Hóast kostnaðurin nú kortini vísir seg at gerast áleið tann sami, sum mett varð av Rambøll í 2009, (j.nr. 2009-2549/9), so er veruleikin tann, at kommunan hevur ikki nakað veruligt val, tí verandi ketil kann bert koyra í stutta tíð afturat, og gerst minni og minni effektivur, so hvørt sum alt fleiri og fleiri rør verða "proppaði" vegna lekar, eins og útskiftingin longu er útsett. Ketilin er frá 1987, og er nú sostatt 25 ára gamal.

Á fíggjarætlanini fyri 2013 eru avsettar kr. 10 mió. til útskiftan av ketli á Brennistøðini.

Neyðugt er tí hjá býráðnum at viðgera málið við atliti til eina tekniska og eina fíggjarliga loysn, og kann umsitingin í hesum sambandi vísa á hetta sum ein møguleiki:

1. At projektið verður framt yvir 2 fíggjarár (2013 og 2014), við einum íløgukarmi í alt á kr. 29,034 mió. íroknað 6,25% mvg,
2. At játtaðar verða kr. 10 mió. av íløgum fyri renovatión 2013, konto 7175
3. At játtaðar verða kr. 19,034 mió. av íløgum fyri renovatión í 2014, kto 7175.

Av øðrum møguleikum sum kunnu umhugsast er lántøka ella at gera eina avgjaldsavtalu við veitaran. Í báðum førum koma rentuútreiðslur afturat, sum ikki eru íroknaðar omanfyri nevnda fíggjartørv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur málið um fígging upp til politiska viðgerð.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Ásannandi at tað er átrokandi at fáa eina loysn, mælir nevndin til at játta kr. 10 mió. av íløgum í 2013 og at avsettar verða kr. 19,1 mió. á íløguætlanini fyri 2014 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Somuleiðis samtykti nevndin at mæla til, at umsitingin og ráðgevin fáa heimild at taka upp samráðingar og gera sáttmála um besta tilboðið, áðrenn tilboðsfreistin gongur út 31. mars 2013.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Samtykt at heimila umsitingini og ráðgevanum at taka upp samráðingar við atliti til at gera sáttmála, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina á fyrstkomandi fundi.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Samráðingar um sáttmála við DPCT vóru hildnar ultimo februar við Rambøll sum okkara samráðingarráðgeva. Semja varð funnin um nærum øll evni, og bert smálutir restaðu í at fáa uppá pláss eftir fundin. Við støði í samráðingunum var DPCT somuleiðis sinnað at lækka kostnaðin nakað, og var endaligur kostnaður upplýstur av umboði fyri DPCT eftirfylgjandi.

DPCT fór tó í likvidatión 28/2. Síðani hevur Rambøll loypandi haft samband við umboð fyri búgvið, og vóru ábendingar um eina danska yvirtøku/rekonstruktión av felagnum

Medio apríl komu boð um, at Danstoker A/S hevur yvirtikið partar av búnum eftir DPCT, og at fyritøkan vil halda áfram sum eitt dóttirfelag hjá Danstoker við navninum Boilerworks A/S, sum eisini var gamla navnið á fyritøkuni.

Fyrst í mai bað Danstoker/Boilerworks um fund við TK/Rambøll um projektið, sum DPCT hevði givið tilboð uppá, og sum Danstoker sigur hóskar til framtíðar strategi felagsins.

Fundur við Danstoker/Boilerworks varð hildin á høvuðssætinum hjá Danstoker í Herning tann 23/5 (j.nr. 2009-2549/51). Niðurstøðan á fundinum var, at samráðingarúrslitið við DPCT, herundir endaligi kostnaðurin á kr. 23,1 mió., ið var upplýstur av umboðum fyri DPCT eftirfylgjandi, verður grundarlag fyri sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Boilerworks A/S um endurnýggjan av ketlinum.

Avtalað var, at Rambøll eftir fundin ger neyðugar rættingar av sáttmálaskjølunum, m.a. broytt nøvn og neyðuga tillaging av tíðarætlan v.m., soleiðis at sáttmálin kann góðkennast í nevndum og býráðnum í juni og síðani undirskrivast ultimo juni.

Kostnaðarmetingin er dagførd, við støði í dagførda tilboðsprísinum hjá Boilerworks. Harumframt eru smærri broytingar í metingini, m.a. at eyka ráðgevaraútreiðslur á 0,1 mió. eru komnar aftrat vegna serligu støðuna, og at metingin av kostnaðinum til burturkastviðgerð í umbyggingartíðini er økt 0,2 mió.
Kostnaðarmetingin fyri alt projektið er nú áljóðandi 30,174 mió., og fíggingartørvurin av íløgum er 28,339 mió. við 6,25 % MVG.

<u>Fyriliggjandi skjøl:</u>
J.nr. 2009-2549/51: Fundarfrágreiðin frá fundi við Danstoker /Boilerworks
J.nr. 2009-2549/52: Danstoker: Hensigtserklæring
J.nr. 2009-2549/53: Útkast til sáttmála (verður væntandi endaliga liðugt 7/6)
J.nr. 2009-2549/54: Dagførd kostnaðarmeting fyri alt projektið

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti til sáttmála (j.nr. 2009-2549/53), og at heitt verður á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, um at játta kr. 10,0 mió. av markaðum íløgum fyri 2013 og kr. 18,4 mió. av íløgum fyri 2014 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og vísir eisini til samtyktina í teknisku nevnd 6. februar 2013 og beinir málið í býráðið um figgjarnevndina. Eisini samtykti nevndin at heita á býráðið um at velja bygginevnd til verkætlanina.

**Ískoyti:**
Arbeiðið uppá ketilin er í gongd og verður liðugt í 2014. Í íløguætlanini fyri 2014 eru avsettar kr. 19 mió. til verkætlanina, sambært sáttmálum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin óg leiðarin á Verkætlanardeilini mæla til, at játta kr. 19 mió. av avsetta íløgukarminum fyri 2014 til verkætlanina og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin Endurnýggjan av ketlinum, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest ein meirnýtsla uppá kr. 187.657.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu brennistøðini mæla til, at verkætlanin verður lokað, at játtaðar verða kr. 188.000 av íløgukarminum á 7175 Renovatión og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 189/16 Ruskinnsavning – útbjóðing av sáttmála

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2015 | 49/15 | 15/03578-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 254/15 | 15/03578-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.02.2016 | 11/16 | 15/03578-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 17.03.2016 | 23/16 | 15/03578-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.05.2016 | 34/16 | 15/03578-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2016 | 39/16 | 15/03578-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 221/16 | 15/03578-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 189/16 | 15/03578-1 |

**Málslýsing:**
Verandi sáttmáli við Sp/f Jón Thomasen gongur út 31. mars 2017. Sáttmálin er longu longdur við tveimum árum, frá 2015 til 2017, og kann í útgangsstøðinum ikki leingjast meira. Støða skal tí takast til nýggja útbjóðing.

Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini heldur, at rusk innsavningin hevur virkað væl í hesum sáttmála skeiðinum. Tænastan hevur verið álítandi og hevur í mestan mun livað upp til ásettu krøvini, og fyrispurningar/klagur eru viðgjørdar/avgreiddar rættiliga skjótt og væl. Tað skal tó viðmerkjast, at tá talan er um umleið 0,5 mió. Borgara kontaktir um árið, slepst ikki undan, at einstakar klagur verða og so er eisini í hesum føri, men talið av klagum hevur verið avmarkað.

Tískil verður mælt til, at innsavningin í einum nýggjum sáttmála tíðarskeiði í stóran mun verður skipað eins og í dag, men umframt at biðja um tilboð uppá verandi veitingar, verður mælt til eisini at biðja um tilboð uppá nøkur alternativ í sambandi við skipan av pappírs innsavningini, til tess at fáa staðfest, um hon kann skipast betri/bíligari.

Hesi alternativ eru til verandi innsavning av pappíri og pappi:

A. At pappír/papp verður heintað í posum í staðin fyri í spannum sum í dag.

   <u>Grundgeving fyri at skifta til posar:</u> Mett verður at innsavning í spannum er dýrari at reka, bæði tí at ruskmenninir skulu ganga tvær ferðir aftur og fram til støðuplássið við spannini, og tí at nýggjar spannir til nýggj hús eru dýrar at keypa. Harumframt er torført at skaffa lok í staðin fyri tey sum brotna á gomlu spannunum, tí tey verða ikki framleidd longur. Tað sum talar ímóti at skifta er at tað er torført at venja fólk við eina aðra skipan enn hana tey eru von við.

B. At pappír/papp verður heintað í einum av somu bilum sum vanliga ruskið. (Ruskbilurin skal sjálvandi verða væl vaskaður áðrenn skift verður frá vanligum ruski til pappír/papp)

   <u>Grundgeving:</u> Verandi arbeiðstakari hevur skotið upp, at TK umhugsar hesa broyting, sum vil viðføra, at ruskbilarnir verða gagnnýttir betri og at tað harvið kann sparast ein ruskbilur. Vansin er, at fólk kunnu fáa ta fatan, at alt verður koyrt í sama bil og sostatt blandað saman og brent, hóast pappír/papp verður skilt frá. Men hesin trupulleiki kann nokk loysast við flytiligum búmerkjum.

C. At arbeiðstakarin pressar/pakkar pappír/papp í ball og síðani í bingju/trailara klárt til útflutnings, í staðin fyri at koyra til Leirvíkar.

Grundgeving: Endamálið við hesum er at kanna, um til ber at fáa betri lønsemi í endurnýtslu skipanina av pappíri og pappi, soleiðis at tað heldur verður ein fíggjarligur fyrimunur enn ein vansi at pappírs nøgdirnar økjast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at:

- Umsitingin fyrireikar útbjóðingartilfar at leggja fyri náttúru- og umhvørvisnevndina til góðkenningar
- At útbjóðingar hátturin verður hin sami sum seinast, t.v.s. alment útboð, og at ein advokat skrivstova stendur fyri útbjóðingini eins og seinast
- At sáttmála tíðarskeiðið verður 7 ár, við møguleika at leingja í 1 ár
- At TK ikki hevur yvirtøku skyldu av ruskbilum, men rætt til at yvirtaka ruskbilar frá arbeiðstakara í serligum førum, t.d. um sáttmálin verður slitin
- At arbeiðstøkan í høvuðsheitum verður skipað sum í dag og at tænastustøðið verður hitt sama, t.v.s.:
    - At innsavningin av húsarhalds burturkasti í posum og vandamiklum burturkasti í klárum posum verður óbroytt.
    - At innsavningin av húsarhald líknandi burturkasti í bingjum frá stovnum og virkjum verður óbroytt.
    - Innsavning av pappíri- og pappi verður kannað nærri í sambandi við útbjóðingina (sí málslýsing omanfyri), so at besta/bíligasta skipanin verður funnin.
    - At innsavning av pappíri og pappi í bingjum frá virkjum og stovnum verður óbroytt.
- At útbjóðingartilfarið verður orðað soleiðis, at til ber at frávelja ella steðga við innsavningini av pappíri og pappi, um tað gerst neyðugt av t.d. fíggjarligum ávum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fyrireikað útbjóðingartilfarið sambært tilmæli til fund í náttúru- og umhvørvisnevndini 07. oktober 2015, tó við hesum tillagingum/broytingum:

- At løgdeildin hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri útbjóðingini í staðin fyri ein advokatskrivstova.
- Broyting í innsavningarøkinum fyri pappír og papp, soleiðis at innsavningin framyvir eisini fevnir um Nólsoy, Hest, Norðradal og Syðradal, sum í verandi sáttmála eru undantikin.
- Nýggj áseting um rottufyribyrgjandi tiltøk í mun til Nólsoy og Hest.
- Nýggj áseting um, at arbeiðstakarin einaferð um árið skal kanna vekt og miðalvekt av ruskposunum, sum kann verða hent og neyðug vitan í planleggingarhøpi.
- Nýggj áseting um, at «føstu» ruskbilarnir skulu lúka nýggjastu umhvørviskrøv (Euronorm), sum eru galdandi í framleiðsluárinum (2016/2017), meðan eyka

ruskbilar, ið kunnu nýtast til í mesta lagi 10% av arbeiðstímunum, skulu lúka Euro V, sum í dag er næsthægsti umhvørvisnormurin.

- At arbeiðstakarin skal hava góðkent øki (vinnuøki) til ruskbilarnar, í mun til verandi sáttmála, har ið ruskbilarnir kunnu standa á økinum hjá KB, um arbeiðstakarin ikki kann vísa á nakað vinnuøki.
- Ásetingin um hvussu meting av tilboðum fer fram er broytt soleiðis, at nú er ásett við % hvussu ymsu parametrarnir verða vektaðir, sambært talvuni niðanfyri:

| **PARAMETUR** | **VEKTING:** |
|---|---|
| Kostnaður | 60 % |
| Veitingartrygd | 15 % |
| Góðska og tænastustøðið | 15 % |
| Arbeiðsumstøður hjá starvsfólki | 10 % |

- Fyri pappírsinnsavning er útbjóðingartilfarið skipað soleiðis, at biðið verður um tilboð uppá verandi innsavning, umframt alternativ A og B, hvør sær ella saman, soleiðis at tað verða 4 ymsir hættir at skipa pappírsinnsavningina uppá, samsvarandi málslýsing omanfyri.
- Ætlanin um at biðja um tilboð uppá alternativ C (pakking av pappíri/pappi) er slept, av hesum orsøkum:
  - Umsitingin hevur ov lítla faktuella vitan og royndir um tílíkt virksemi og harvið ikki nóg haldgott grundarlag at byggja útbjóðingartilfarið á.
  - Umsitingin metir, at slíkt virksemi víkir ov nógv frá tí slagnum av arbeiðstakara virksemi, sum innsavning av burturkasti er, og tí kann halda áhugaðar arbeiðstakarar burtur frá útbjóðingini og harvið minka um kappingina.
  - Umsitingin metir, at slíkt virksemi krevur serliga vælegnað høli og umstøður/útgerð annars, sum helst eingin ella bert einstakir arbeiðstakarar hava ella kunnu útvega, og tískil avmarkar talið av møguligum tilboðsgevarum og harvið minkar tað um kappingina.

Tilgongd og tíðarætlan fyri útbjóðingina er soleiðis uppsett:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Útbjóðingartilfar góðkennast | 10/02-16 (náttúru- og umhvørvisnevnd) |
| 2. | Útbjóðingin kunngerast: | 12/02-16 (heimasíða/bløð) |
| 3. | Útbjóðingartilfar útflýggjast: | 15/02-16 (løgdeildin) |
| 4. | Seinasta freist at seta spurningar: | 21/03-16 (tilboðsgevarar) |
| 5. | Freist at svara spurn. (TK): | 29/03-16 (løgdeildin) |
| 6. | Lisitatión verður | 04/04-16 (TK – Ráðhúsið) |
| 7. | Meting/tilmæli gerast | 05/04-16 (til 29/4-16 (Arbeiðsbólkur) |
| 8. | Nevndarviðgerð | 04/05-16 (náttúru- og umhvørvisnevnd) |
| 9. | Nevndarviðgerð | 11/05-16 (Fíggjarnevnd) |
| 10. | Býráðsviðgerð / -samtykt | 19/05-16 (Býráðið) |
| 11. | Sáttmálin tekur við | 01/04-17 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at fyriliggjandi útbjóðingartilfar, j.nr. 15/03578-4 verður góðkent, og at ruskinnsavningin verður boðin út samsvarandi hesum og fyriliggjandi tíðarætlan.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við útbjóðingartilfarinum og at hava undangóðkenning, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Lýst varð í tíðarskeiðnum 15. - 29. februar í bløðum, heimasíðu og internetportalum eftir umsøkjarum til at verða undangóðkendir til at geva tilboð uppá ruskinnsavningina. 6 áhugaðir umsøkjarar bóðu um útbjóðingartilfarið. Tá freistin var úti tann 14/3-2016, kl. 12, vóru 3 umsóknir komnar inn.

Ein arbeiðsbólkur við umboðum frá løgdeildini, fíggjardeildini, verkstaðnum og Kommunalu Brennistøðini, viðger umsóknirnar og kemur við tilmæli til fundin.

Niðurstøða og tilmæli hjá arbeiðsbólkinum:
Inn komu 3 umsóknir um undangóðkennng, frá:

- Sp/F Jón Thomasen
- IR Lastbilar Sp/F
- FMS Sp/F

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt umsóknirnar og mælir til at undangóðkenna Sp/F Jón Thomasen og IR Lastbilar Sp/F. Arbeiðsbólkurin metir ikki, at FMS Sp/F lýkur treytirnar fyri undangóðkenning, og mælir tí frá, at FMS Sp/F verður undangóðkent.

Grundgevingin fyri at arbeiðsbólkurin metir, at FMS Sp/F ikki kann undangóðkennast, eru serliga hesar í mun til krøvini ísv. undangóðkenningina:

1. Felagið hevur ikki tilsøgn um kravda bankatrygd.
2. Felagið uppfyllir ikki kravið um vælferðarkrøv til starvsfólk á nøktandi hátt.
3. Felagið uppfyllir ikki kravið um parkeringsumstøður til ruskbilar á nøktandi hátt.
4. Felagið hevur ikki nøktandi loysn ella umstøður viðvíkjandi umvælingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til at fylgja niðurstøðuni hjá arbeiðsbólkinum og sostatt undangóðkenna Sp/F Jón Thomasen og IR Lastvognar Sp/F.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 17. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Notat er gjørt til fundin, j.nr. 15/03578-37.
Kunnað verður um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. mai 2016:** Kunnað varð um málið.

Licitatiónin var hildin 18/4-2016. Hesi tilboð komu inn:

| **Innkomin boð:** | **SP/F Jón Thomassen** | **SP/F IR Lastbilar** | **Munur** |
|---|---|---|---|
| Veiting I | 6.522.696,96 | 5.944.598,40 | 578.098,56 |
| Veiting II Loysn 1 - sum í dag | 1.423.398,08 | 1.043.870,36 | 379.527,72 |
| Veiting II Loysn 2 - sum í dag men í posum | 1.091.903,28 | 1.043.870,36 | 48.032,92 |
| Veiting II Loysn 3 - ruskbilur við spannum | 970.806,20 | 995.160,92 | -24.354,72 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Veiting II Loysn 4 - ruskbilur við posum | 639.311,40 | 995.160,92 | -355.849,52 |
| **Samlað upphæd** | | | |
| Veiting II Loysn 1 - sum í dag | 7.946.095,04 | 6.988.468,76 | 957.626,28 |
| Veiting II Loysn 2 - sum í dag men í posum | 7.614.600,24 | 6.988.468,76 | 626.131,48 |
| Veiting II Loysn 3 - ruskbilur við spannum | 7.493.503,16 | 6.939.759,32 | 553.743,84 |
| Veiting II Loysn 4 - ruskbilur við posum | 7.162.008,36 | 6.939.759,32 | 222.249,04 |

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt tilboðini og er komin til hesa niðurstøðu:

Val av loysn fyri veiting II:
Endamálið við at kanna 4 ymsar loysnir fyri veiting II var fyrst og fremst at kanna eftir, um til bar at fáa veitingina framda á ein bíligari hátt. Tilboðið hjá verandi arbeiðstakara SP/F Jón Thomasen vístu (isolerað sæð), at nakað kundi sparast við at broyta skipanina. Men tilboðini hjá hinari undangóðkendu fyritøkuni SP/F IR Lastbilar vóru somikið eins og harumframt lægri, at tað ikki gevur nakra meining at broyta skipanina, tí hann kann veita verandi innsavningarskipan fyri stórt sæð sama kostnað sum ein broytt skipan.
Tískil mælir arbeiðsbólkurin til at velja loysn 1 (sum í dag) og harvið einans at sammeta tilboðini við valdu loysn 1.

Sammeting av tilboðum:
Sambært útbjóðingartilfarinum verða tilboðini vektaði sambært talvuni niðanfyri:

| **PARAMETUR** | **VEKTING:** |
|---|---|
| Kostnaður: | 60% |
| Veitingartrygd: | 15% |
| Góðska og tænasta: | 15% |
| Arbeiðsumhvørvi: | 10% |

Arbeiðsbólkurin hevur útfrá upplýsingunum í innlatnu tilboðunum mett um hesi og vektað sambært talvuni omanfyri, sí skjal nr. 15/03578-39 fyri nærri útgreining. Viðmerkjast skal, at fyri veiting II er vektað við loysn 1, sum er sama skipan sum verandi skipan.

Úrslitið av metingini er hetta:

| **PARAMETUR** | **VEKTING:** | **MAX STIG** | **SP/F JÓN THOMASEN** | **SP/F IR LASTBILAR** |
|---|---|---|---|---|
| Kostnaður: | 60% | 4,20 | 3,69 | 4,20 |
| Veitingartrygd: | 15% | 1,05 | 0,98 | 0,94 |
| Góðska og tænasta: | 15% | 1,05 | 0,87 | 0,90 |
| Arbeiðsumhvørvi: | 10% | 0,70 | 0,63 | 0,53 |
| **Samlað stig** | 100% | 7,00 | **6,16** | **6,56** |

Niðurstøðan er sostatt, at tilboðið frá SP/F IR Lastvognar er tað besta boðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til at fylgja niðurstøðuni hjá arbeiðsbólkinum og sostatt taka av tilboðnum frá SP/F IR Lastvognar uppá veiting I og

veiting II (loysn 1), og gera sáttmála partanna millum sambært útbjóðingartilfarinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

## 190/16 Framflyting og meirjáttan Tórshavnar havn 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 30.05.2016 | 25/16 | 16/02132-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 231/16 | 16/02132-1 |
| 3 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 190/16 | 16/02132-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 16/02132-1 |

**Málslýsing:**
Samlaði íløgukarmurin fyri Tórshavnar havn í 2016 er 200 mió.
Íløgukarmurin fyri Tórshavnar havn 2015, var kr. 76.655.455
Gjørdar íløgur í 2015 vóru kr. 53.967.005
Framflyting av íløgum til 2016, er munurin á játtaðum íløgukarmi 2015 á kr. 76.655.455 og gjørdum íløgum 2015 á kr. 53.967.005, sum er kr. 22.688.450.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at flyta kr. 22.688.450 til íløgur 2016

**Vinnunevndin 30. mai 2016:** Samtykt.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

# 191/16 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 115/16 | 16/00040-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 70/16 | 16/00040-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 151/16 | 16/00040-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 119/16 | 16/00040-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 155/16 | 16/00040-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 167/16 | 16/00040-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 232/16 | 16/00040-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | | | 16/00040-1 |
| 9 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 191/16 | 16/00040-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Framlagt og góðkent.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 23:45</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Johan Olsen |
| | Sigrun Amalia Mohr | |